| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1216<br><br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 16. desember 2021 **Kl**. 17:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 310/21-331/21

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Birita Baldvinsdóttir Iversen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**
Súna Mørk

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 310/21 | 21/04979-1 | Súna Mørk bert frá at møta á býráðsfundi 16. desember 2021 | 1218 |
| 311/21 | 21/00012-1 | Mál beind í nevndir 2021 | 1219 |
| 312/21 | 21/04737-1 | Eykajáttan til ávísar barnaverndarkontur 2020 - 2021 | 1221 |
| 313/21 | 20/00868-1 | Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr) | 1224 |
| 314/21 | 21/03318-2 | Stuðul til vognrúm og skiftirúm Sankta Jósefs Barnagarður | 1233 |
| 315/21 | 21/03312-3 | Fótbóltsvøllurin inni í Vika: Endurnýggjan av graslíkisvøllinum | 1235 |
| 316/21 | 21/04845-2 | Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23 | 1238 |
| 317/21 | 21/00341-1 | Keyp av trøðní á Sundsvegnum, matr. nr. 1379a, Tórshavn | 1241 |
| 318/21 | 21/00688-6 | Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 250a, 250b, 250c, 250d, 250e, 250f og 250g á Argjum til ummælis og keypa av økið | 1244 |
| 319/21 | 21/03116-8 | Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1225q, Tórshavn | 1247 |
| 320/21 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 1249 |
| 321/21 | 21/04189-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar | 1252 |
| 322/21 | 20/00719-6 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga | 1255 |
| 323/21 | 21/04063-1 | Nýggj útstykking á Velbastað | 1261 |
| 324/21 | 20/03223-1 | Umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 722c, Tórshavn frá A1 til 2. grundumráði | 1264 |
| 325/21 | 20/04650-3 | Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn | 1268 |
| 326/21 | 21/03382-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 1274 |
| 327/21 | 21/04476-1 | Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2022 | 1282 |
| 328/21 | 21/04877-2 | Málslýsing - Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum | 1283 |
| 329/21 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 1285 |
| 330/21 | 21/00010-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021 | 1293 |
| 331/21 | 18/04082-5 | Kunning um Arctic Mayors' Forum | 1297 |

**Til viðgerðar**

## 310/21 Súna Mørk bert frá at møta á býráðsfundi 16. desember 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 310/21 | 21/04979-1 |

**Málslýsing**
Súna Mørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Tikið til eftirtektar, at Birita Baldvinsdóttir Iversen tekur sæti fyri Súnu Mørk.

# 311/21 Mál beind í nevndir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 38/21 | 21/00012-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 48/21 | 21/00012-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 74/21 | 21/00012-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 138/21 | 21/00012-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 163/21 | 21/00012-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 207/21 | 21/00012-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 245/21 | 21/00012-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 283/21 | 21/00012-1 |
| 9 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 311/21 | 21/00012-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Enmælt samtykt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 312/21 Eykajáttan til ávísar barnaverndarkontur 2020 - 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 78/21 | 21/04737-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 23.11.2021 | 86/21 | 21/04737-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 313/21 | 21/04737-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 309/21 | 21/04737-1 |
| 5 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 312/21 | 21/04737-1 |

**Upprunin til málið**
Eykajáttanartørvur á kontunum 2612 Barnavernd, konta 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju, og konta 2617 Brúkaragjøld, serstovnar, tilsamans kr. 6,5 mió.

**Lýsing av málinum**
Sum kunnað um í trivnaðarnevndini í september, hava ávísar av barnaverndarkontunum meirnýtslu. Talan er um konturnar 2612 Barnavernd, 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju, og 2617 Brúkaragjøld, serstovnar.

Niðanfyri er yvirlit yvir mettu meirnýtsluna fyri alt árið 2021. Í øllum trimum førum stavar ein partur av meirnýtsluni frá árinum 2020.

| *Tkr.* | Framroknað pr. okt/2021 | Framflyting 2020 | |
|---|---|---|---|
| 2612 Barnavernd | -988 | -483 | |
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | -2.164 | -1.021 | |
| 2617 Brúkaragjald, serstovnar | -1.256 | -599 | |
| | -4.408 | -2.103 | **-6.511** |

Talan er um lógarbundnar útreiðslur og kostnaðir í sambandi við umsorganaryvirtøkur og kostnaðir fyri fyribyrgjandi fyriskipanir sbrt. barnaverndarlógini.

Orsøkin til útreiðslugongdina sum heild síðstu árini er serliga eitt hækkandi tal av umsorganaryvirtøkum, ið síggjast aftur í kontu 2613 og kontu 2617. Hinvegin halda útreiðslurnar á kontu 2612 seg á sama støðið.

| *Tkr.* | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 mett |
|---|---|---|---|---|
| 2612 Barnavernd | 6.974 | 6.845 | 6.444 | 6.915 |
| 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju | 12.844 | 15.747 | 18.073 | 18.648 |
| 2617 Brúkaragjald, serstovnar | 2.447 | 3.081 | 4.818 | 5.141 |

Hóast tiltøk eru gjørd at tálma útreiðsluvøksturin, hvat fyriskipanum viðvíkur, so má staðfestast, at yvirhøvur hevur fíggjarætlanin verið ov lágt sett. Fíggjarætlanaruppskotið 2022 er stillað eftir mettu kostnaðinum fyri 2021.

Trivnaðarnevndin hevur av teimum játtanum, sum nevndin varðar av, ikki møguleika at fíggja eykajáttanartørvin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Barnaverndarlógin
Játtanarskipanin

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Eftirmeting av barnavernd

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla nevndini til at heita á fíggjarnevndina um at útvega fígging til eykajáttan viðvíkjandi nevndu kontum.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til lýsing omanfyri av eykajáttanartørvinum á ávísum kontum innan barnavernd.

Skotið verður upp at fíggja størsta partin av tørvinum av kontum, sum í inniverandi fíggjarárið væntast at hava minninýtslu við ársenda, umframt av meirinntøkum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1110 | Býráðið | 300.000 | Minninýtsla |
| 1312 | Trivnaðarfyrisitingin | 100.000 | Minninýtsla |
| 2512 | Integratión | 500.000 | Minninýtsla |
| 2722 | Tilboð | 1.500.000 | Minninýtsla |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3211 | Námsfrøðilig ráðgeving | 400.000 | Minninýtsla |
| 3217 | Dygdarmenning | 400.000 | Minninýtsla |
| 5312 | Mentanarhølir | 250.000 | Minninýtsla |
| 5313 | Múllers pakkhús | 350.000 | Minninýtsla |
| 7315 | Kommunuætlan | 450.000 | Minninýtsla |
| | Av meirinntøkum | 2.100.000 | |
| | **Tilsamans** | **6.350.000** | |

Skotið verður upp, at fíggingin verður býtt soleiðis út á nevndu barnaverndarkontur:

| | | |
|---|---|---|
| 2612 | Barnavernd | 1.425.000 |
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 3.100.000 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | 1.825.000 |
| | **Tilsamans** | **6.350.000** |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta tilsamans kr. 6.350.000 sambært yvirlitinum omanfyri sum eykajáttan til konturnar 2612 Barnavernd kr. 1.425.000, 2613 Børn sett heiman í fosturfamilju kr. 3.100.000, og 2617 Brúkaragjald, serstovnar kr. 1.825.000 og beina málið til tvær býráðsviðgerðir um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 23. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 313/21 Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 63/20 | 20/00868-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 315/20 | 20/00868-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 329/20 | 20/00868-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 298/20 | 20/00868-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 11/21 | 20/00868-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 19/21 | 20/00868-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 70/21 | 20/00868-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 153/21 | 20/00868-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 147/21 | 20/00868-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 171/21 | 20/00868-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 15.11.2021 | 277/21 | 20/00868-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 308/21 | 20/00868-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 280/21 | 20/00868-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 321/21 | 20/00868-1 |
| 15 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 313/21 | 20/00868-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt hin 30. oktober 2019 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar um at Realskúlin, Skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gjørt er uppskot til skipan av stovninum, harundir viðvíkjandi plásskapasiteti. Gjørt er eisini uppskot til tillaging av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi og kostnaðarmeting tí viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at stovnsheitið verður Miðstovnurin, sum longu verður brúkt á staðnum.

Í viðgerðina er eisini tikin við vøggustovuvirksemið, sum Miðstovnurin hevur í Hornabø. Harumframt hevur eisini verið viðgjørt hølistørvur til børn við serligum tørvi, sum í dag heldur til í leigumáli á Frælsinum.

Hølisstøðan hjá Stella Maris Vøggustovu hevur eisini verið viðgjørd sum partur áv hesum máli, sí tilmæli í máli 19/01795.

Høvuðsbygningarnir eru Realskúlin og Kongagøta við hvør sínum fimm stovum. Til ber at skipa virksemið alt eftir tørvi (hóskandi *flowi*). Samlaði plásskapasiteturin í báðum bygningunum verður uml. 50-53 vøggustovubørn og 100-110 barnagarðsstovubørn.

Húsini hjá Frk. Cohr gevur Miðstovninum umstøður til børn við serligum avbjóðingum, har møguleiki er at fara burtur frá eftir tørvi, umframt til annað atknýtt virksemi hjá stovninum. Garðsøkið verður skipað eftir aldri á børnunum.

Miðstovnurin hevur vøggustovu í Hornabø. Nú Miðstovnurin verður víðkaður, er fyri virksemið skilabest er at flyta alt virksemið á eitt stað.

Bygningurin í Hornabø verður hinvegin mettur væl egnaður at hýsa tilboðnum til børn við serligum tørvi, sum í dag eru á Frælsinum. Í hesum sambandi verður mælt til at siga upp leigusáttmála við UMMR og flyta tilboðið í Hornabøm, tá bygingurin verður tøkur.

Gjørt er uppskot til tillagingar av bygninginum í Kongagøtu, sí skjal. Gjørd er eisini kostnaðarmeting av hesum íroknað garðsøkið, sí skjal. Hesi verða løgd fram á fundinum.

Íløgujáttan er ikki tøk til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova
18/02825 Leigumál á Frælsinum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Byggingin, tá allur bygningurin er tikin í nýtslu, er ætlað at økja plásskapasitetin, sum hevur við sær øktan rakstur samsvarandi barnatalinum. Væntað verður, at aftrat teimum 5 mió í íløgujáttan 2021 skulu aðrar umleið kr. 2 mió til at fáa allan bygningin kláran.

| | Býráðsfundur<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1226<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 5.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

## Játtan:

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk | 3175 | Nýggj projektkonta | | 3175 | L00001 Løgukarmur | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarastjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið og fíggjartørvin.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til málslýsingina omanfyri og íløgujáttan í fíggjarætlanini 2021 kr. 5 mió á løgukontu 3175 Barnaansing til Miðstovnin.

Skúlavirksemið í skúlanum í Kongagøtu er flutt út á Fløtir, og alstórur tørvur er at fáa bygningin gjørdan kláran til dagsstovnavirksemið hjá Miðstovninum (fevnandi um Realskúlan, skúlan í Kongagøtu og Frk. Cohr-húsini), sum áður er samtykt.

Partur av hesum er at flyta dagstovnavirksemi úr øðrum hølum. Frítíðartilboðið á Frælsinum 30 til børn við serligum avbjóðingum skal flyta til Hornabø í seinasta lagi um ársskiftið, tá leigumálið við UMMR gongur út. UMMR hevur gjørt nýggja leiguavtalu við ÍSF um hølini. Vøggustovuvirksemið, sum er í Hornabø í dag, skal flyta í Miðstovnin.

Í løtuni eru frammanundan ov nógv børn í Realskúlanum, tí ætlanin at gera skúlan í Kongagøtu um til dagstovnavirksemið hevur drigið út. Neyðugt er at gera bráðfeingis tillagingar í Frk. Cohr-húsinum (smáar tillagingar) og í skúlanum í Kongagøtu (meira umfevnandi).

Aftrat hesum er alneyðugt at lata upp fleiri vøggustovupláss í BARN skipanini. Framrokning av plásstørvi vísir, at í januar 2021 og frameftir vanta í minsta lagi 47 vøggustovupláss. Verða ikki fleiri vøggustovupláss útvegað, verður bíðitíðin hjá foreldrum at fáa pláss til børnini enn drúgvari. Harumframt tekur Stella Maris Vøggustova ikki fleiri børn inn.

Játtanin er tí eisini ætlað til at lata tvær vøggustovur (uml. 18-20 pláss tilsamans) upp aftrat í Miðstovninum sum skjótast tíðarætlan fyri tillagingarnar er greið.

Hesar kr. 5 mió røkka til ein part av ætlaðu bygningstillagingunum, men nóg mikið til at fáa virksemið í parti av bygninginum í gongd og góðkent. Umframt okkurt smávegis arbeiði í Frk. Cohr-húsinum er tað serliga ovara hæddin í Kongagøtu, har innrættast skal nýggj vøggustova við skiftiumstøðum, verjur móti trappum, nýggjan felags køk, vesini tillagast til vøggustovur við skifti møguleikum og smáum kummum, garderobur o.a. skal setast upp, og málaraarbeiði skal gerast.

Neyðugt er at fáa arbeiðið í gongd beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at heimila umsitingini at fyrireika og gera avtalur um ymsu arbeiðini á Miðstovninum, og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió á kontu 3175 Barnaansing til løgukontu við heitinum Miðstovnurin.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum við tí ískoyti, at arbeiðið skal bjóðast út og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mæla til at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur til støðutakan tá tilboð eru innkomin.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøður ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin boðaði nevndini í tposti 25. januar 2021 frá bráðfeingis hølistørvi til dagstovnin Miðstovnin, sum loystur verður við at stutttíðarleiga høli frá Bústøðum í Finsen, og sum nú verður formliga lagt fyri nevndina, sí avtaluuppskot.

Talan er um loysn í uml. 6 mánaðir, ið kostar kr. 20.000 mánaðarliga umframt el/hita, sí sáttmála, har til ber at leingja leigumáli stutt tíðarskeið eftir tørvi.

Arbeiðið at gera skúlan í Kongagøtu til dagstovnavirksemi verður í fyrsta lagi liðugt í summar, møguliga nakað út á heystið. Í løtuni verður útboð fyrireikað. Tá tíðarætlanin er greið ber til at bjóða nýggj pláss í BARN.

Støðan hevur avleiðingar bæði fyri Miðstovnin og serfrítíðarskúlan á Frælsinum, hvørs leigumál á Frælsinum gekk út á nýggjárinum, og har ÍSF sum nýggjur leiðari ikki er sloppin inn vegna virksemið hjá kommununi í bygninginum.

Beint nú eru 32 vøggustovubørn og 43 barnagarðsbørn í realskúlanum. Hetta er alt ov nógv í mun til støddina á bygninginum. Ætlanin var, at barnagarðsbørnini longu vóru flutt í Kongagøtu, og við hølunum í Finsen ber til at flyta flestu barnagarðsbørnini úr realskúlanum, sum sostatt gevur ta luft, ið skal til fyri at realskúlin kann hava eitt vanligt barnatal.

Hølini krevja ávís arbeiði at gera klár til dagstovnavirksemi m.a. garderobur, vask, ljóðplátur og hegn millum bygningarnar. Arbeiðið er sett í gongd. Ætlanin er at fíggja hesar tillagingar og rakstur av hølunum við verandi játtanum konta 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur.

Útbjóðing av arbeiðinum í Gula skúla er undir fyrireiking og ætlast lagt fyri nevndina á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla til at samtykkja leiguavtaluna við Bústaðir fíggjað av kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 17. desember 2020, har umsitingini er heimilað at bjóða út arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn og gera avtalur um ymsu arbeiðini.

Síðan tá er leigumál gjørt viðvíkjandi hølum í Finsen sum bráðfeingis loysn viðvíkjandi plássum. Eisini er verkætlanin nágreinað og kostnaðarmett, sí hjálagdu tekningar og kostnaðarmeting.

Heimildin at gera avtalur fevnir um tøku játtanina kr. 5 mió. Sbrt. kostnaðarmetingini verður hetta tepurt. Tá tilboðini koma inn, má metast um møguliga meirfígging ella tillaging av verkætlanini.

Kostnaðarmetingin fevnir eisini um útiøkið og spælipláss, sum í ávísan mun eisini hevur samband við Grasagarð, Frk. Cohr garðin og Finsen. Við atliti at tøku játtanini verður tó mett neyðugt at raðfesta arbeiðið við bygninginum fyrst, men soleiðis, at girðingar og trygd kring økið verður gjørd til tess at dagstovnaplássini kunnu fáast í brúk skjótast.

Harumframt skal upplýsast, at sjálv Kongagøtan í næstum verður grivin upp í sambandi við fjarhitaleiðing, og at tað í mun til útiøkið og spælipláss til Miðstovnin er skilabest at bíða eftir, at tað arbeiðið er liðugt. Tíðarætlan í hesum sambandi er ógreið í løtuni. Aftrat skulu skúrarnir í Frk. Cohr-garðinum av økinum fyri at geva pláss til spælipláss og útileikur. Arbeiðið við útiøkinum verður tí at taka upp seinni og játtan útvegast til tað.

Arbeiðið verður boðið út til tveir arbeiðstakarar sum undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 7. mai 2021. Úrslitið varð hetta:

- Búsetur kr. 6.805.598
- North kr. 8.365.894

Eingin teirra hevur fyrivarni.

Samlaða kostnaðarmetingin, sí hjálagt, við innbúgvi, ráðgeving, spælipláss/spæliútgerð, mvg, óvæntað v.m. er kr. 11.482.137,45 – tá er roknað við kr. 2 mió til spæliplássið/spæliútgerð, sum mett verður er alneyðugt at hava við, so at námsfrøðiliga virksemið inni og úti kann virka nøktandi.

Byggiarbeiðið verður sambært ætlanini liðugt miðjan mars 2022. Leigumálið um fyribilshøli til stovnin í Finsen má leingjast samsvarandi byggitíðini, tvs. til og við mars 2022. Útreiðslan er tikin við í kostnaðarmetingina omanfyri.

Tøk løgufígging til hesa verkætlanina L31012 Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin) er kr. 5 mió, fíggjartørvur er sostatt kr. 6,5 mió.

Á grein 3 í fíggjarætlanini eru tvær aðrar íløgujáttanir til ávikavist Dagstovnin á Argjum kr. 1 mió og Frítíðarskúlan í Kollafirði kr. 2 mió. Báðar verkætlanir eru í fyrireiking.

Skotið verður tí upp, at restfíggingin til umbyggingina av Miðstovninum við spæliplássi kr. 6,5 mió verður játtað til endamálið í íløguætlanini fyri 2022.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til:

- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur,
- at restfígging kr, 6,5 mió verður játtað til endamálið av íløguætlanini 2022,
- at leingja leiguavtalu við Bústaðir um høli í Finsen til og við mars 2022, og
  at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setir málið á skrá við uppskoti um at annulera útboðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn, og í staðin at útvega nýggj pláss í Lonunum í Hoydølum og í Stella Maris Vøggustovu. Víst verður í hesum sambandi til mál 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu, sum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini, og har ætlanin er at brúka bygningin í Kongagøtu til skúla. Víst verður eisini til mál 19/01963 Tøkir skúlabygningar og 19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
**Miðstovnurin:**
Samráðingar hava verið við Búsetur um arbeiðstøkusáttmála. Samráðingarnar eru steðgaðar vegna omanfyri nevnda. Tað er í skrivandi løtu ógreitt, um Búsetur leggur fíggjarligt krav móti kommununi.

Uppskotið hevur við sær, at bygningurin í Kongagøtu ikki verður partur av Miðstovninum sum samanhangandi dagstovnur við realskúlan og Frk. Cohr-húsið.

Hetta broytir ætlanina við Miðstovninum í miðbýnum grundleggjandi, serliga við atliti at plásskapasitetinum.

Arbeitt hevur verið fram í móti, at Miðstovnurin við Kongagøtu og Realskúlanum kundu hava 4 vøggustovur við tilsamans 51 plássum og 5 barnagarðsstovur við tilsamans 110 plássum. Um Miðstovnurin framyvir bert er realskúlin, er talan um 1 vøggustova við tilsamans 14 plássum og 3 barnagarðsstovur við 38 plássum í alt.

Samlað er talan um 37 færri vøggustovupláss og 72 færri barnagarðspláss á Miðstovninum enn roknað var við.

Miðstovnurin hevur í dag stutttíðar leigumál í Finsen, tí hesi børn skuldu ætlandi í Kongagøtu næsta summar. Nakrar smáar tillagingar vórðu gjørdar í hølunum í hesum sambandi. Finsen verður mett ikki at vera nøkur varandi loysn til dagstovnavirksemi, men í eini tillagingargongd, har Miðstovnurin í realskúlanum fær skipað seg, verður neyðugt at halda fram við leigumálinum eini tvey-trý ár aftrat.

Um stovnurin skal halda fram har, so skulu størri tillagingar gerast, eitt nú eru tað betong gólv og ógvuliga hart hjá starvsfólkum at ganga á og hjá børum at spæla á. Umframt annað gólv, mugu eisini vesi viðurskiftini gerast betri.

Í hesi tillagingargongd verður ikki latið upp fyri fleiri plássum í Miðstovnunum, tí talið av børnum er alt ov høgt í mun til, hvat realskúlin rúmar. Nýggj pláss til vøggustovu og barnagarðsstovu verða ikki at fáa aftur fyrr enn 1. august 2024. Tá svarar barnatalið til tað, sum realskúlin rúmar.

Støða skal eisini takast til, hvussu realskúlin skal skipast bæði í mun til tal av plássum og samanseting av vøggustovu og barnagarðsstovu. Bygningurin hevur tørv á umvælingum og dagføringum, skal allur bygningurin, m.a. eisini loftið, kunna nýtast til dagstovnavirksemi. Eisini manglar stovnurin spælipláss, goymslupláss til leikur, og pláss at stilla barnavognar, tá vøggustovubørnini sova.

Væntað hevur verið, at Miðstovnurin tók nýggj børn inn í bygningin í Kongagøtu frá summarinum 2022. Foreldur hava samsvarandi havt møguleika at bóka pláss á Miðstovninum. Broytingin hevur við sær, at 10 foreldur skulu hava boð um at bóka annað pláss á øðrum stovni ella fáa í boði fyribilspláss í Lonunum í Hoydølum.

Steðgað verður samstundis fyri nýggjum upptøkum í Miðstovninum fram til januar 2024, tí stovnurin, nú Kongagøta ikki er í myndini, hevur ov nógv børn inn alt hetta tíðarskeiðið (upp til 14 børn ov nógv í barnagarðinum og 17 í vøggustovuni).

**Annar plásskapasitetur:**
Við ætlanini at lata Stella Maris Vøggustovu at halda fram eru 35 vøggustovupláss tøk, tá stovnurin er fullur. Stovnurin hevur havt hægri barnatal, men tað hevur verið hægri enn fermetratalið pr. barn loyvir. Bygningurin skal umvælast, endalig tíðarætlan og kostnaðarmeting er ikki tøk, heldur ikki, um neyðugt er at steingja stovnin í byggitíðini.

Sankta Jósefs Barnagarður fer at hava 2 vøggustovur og 2 barnagarðsstovur, áður vóru 4 barnagarðsstovur við tilsamans 85 plássum. Hetta hevur við sær, at talið av barnagarðsplássum lækkar við tilsamans 34 plássum yvir tvey ár. Hinvegin koma koma tilsamans 20 nýggj vøggustovupláss yvir 2 ár.

Lonirnar í Hoydølum eru í verandi støðu bert ein fyribilsloysn til ársenda 2023 samsvarandi loyvinum frá friðingarmyndugleikunum, sí skjøl 14 og 1). Ætlan um at endurútvega hesi pláss eigur at fara í gongd skjótast. Í løtuni hava upp til 27 børn fyribilspláss í Lonunum. Skal stórt tal av fyribilsplássum stovnast í Lonunum aftrat, er neyðugt at gera ávísar umstøður betri, eitt nú vesir og útiøki, og sum fígging má útvegast til.

Tá serskúlatilboðið í Lonunum er flutt í Eysturskúlan um nýggjársleitið, kann dagstovnavirksemið í Lonunum í Hoydølum víðkast til at fevna um 3 barnagarðsstovur (60 børn) og 4 vøggustovur (48 børn). Talan er tó um fyribilspláss, ikki um varandi pláss. Verða børnini tikin inn uppá fyribilspláss, má kommunan samstundis tryggja, at onnur varandi pláss eru tøk til at taka ímóti børnunum í seinasta lagi við ársenda 2023, t.e. um tvey ár, tá loyvið í Hoydølum gongur út.

**Plásstørvur:**
Í løtuni kann kommunan ikki vísa á onnur varandi pláss enn tey, sum eru í skipanini í dag, tí eingin útbyggingarætlan er í gongd. Samráðingar eru við Búsetur um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum við fimm stovum, men hesi pláss verða ikki fyrr enn um 15-18 mánaðirnar í fyrsta lagi, um byggiarbeiðið byrjar nú. Støðan viðvíkjandi høvuðsumvæling ella nýbygging av Dagstovninum á Argjum er tá ikki tikin við.

Í juni 2021 varð átrokandi plásstørvurin mettur til at vera upp móti 90 børnum. Talan er her um børn, ið eru eldri enn 1 ár, og enn ikki vóru sloppin inn á stovn. Í løtuni er støðan við plásstørvi á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu tann, at tað støðugt eru fleiri børn á hvørjum stovni, enn tað í roynd og veru eru pláss til sambært reglunum. Samstundis hevur eitt vaksandi barnatal við fleiri stórum fylgjandi árgangum frá 2018 og fram til nú umframt tilflyting við sær, at tørvurin økist nakað afturat komandi árini.

Metti tørvurin á nýggjum føstum dagstovnaplássum er sostatt umleið 130 vøggustovupláss og 95 barnagarðspláss. Hesi pláss nøkta átrokandi tørvin, har hædd eisini er tikin fyri einum nakað vaksandi barnatali, samstundis sum at talið av børnum á verandi dagstovnunum ikki skal vera hægri, enn stovnarnir eru roknaðir til.

**Fíggjarviðurskifti dagstovnaøkið:**
Tey yvir 100 plássini í Kongagøtu var sera bílig loysn hjá kommununi at nøkta ein stóran part av plásstørvinum á dagstovnaøkinum. Í fíggjarætlanini 2021 eru kr. 5 mió settar av til endamálið og í fíggjarætlanaruppskotinum 2022 aðrar kr. 4 mió.

Skal realskúlin vera verandi dagstovnur, verður sum omanfyri nevnt neyðugt at gera hølisumstøðurnar betri umframt at etablera spælipláss. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur. Harumframt kemur kostnaður at leingja leigumál í Finsen uml. kr. 250.000 um árið. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur um aðrar tørvandi tillagingar í Finsen, sí eisini omanfyri.

At gera Stella Maris Vøggustova í nøktandi stand er mett til kr. 6-7 mió.

At gera neyðugar hølistillagingar í Lonunum í Hoydølum mugu síggjast saman við, at bygningurin, so sum loyvini nú eru, bert skal virka tvey ár aftrat, í øllum førum á hesum stað. Neyðugt er at fáa fleiri vesi gjørd. Eisini skal eitt hóskandi spælipláss gerast. Harumframt er kostnaður til at etablera fleiri stovur. Neyv kostnaðarmeting fyriliggur ikki. Leigukostnaður árliga er kr. 1,1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka støðu til at annulera útboðið viðvíkjandi arbeiðnum tillaga bygningin í Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Mentamálanevndin 15. november 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at annulera útboðið viðvíkjandi tillagingum av bygninginum í Kongagøtu til

dagstovnavirksemi. Harumframt samtykt, at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at betra hølisviðurskiftini í Finsen og útiøkið til Miðstovnin, og at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at gera umstøðurnar í Lonunum í Hoydølum klárar til størri barnatal, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, samtykti at halda fast í ætlanini at tillaga bygningin i Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðið at gera bygningin til dagstovnavirsekmið íroknað spælipláss innanfyri ein karm uppá kr. 3 mió at fíggja av løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, og at leggja málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, mælir til at játta tær upprunaligu fimm milliónir krónurnar til arbeiðið at gera bygningin kláran til dagstovnavirksemi.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Gunvør Balle:

Mælt verður til:
- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur
- at restfígging kr. 6,5 mió. Kr. Verðu rjáttað til endamálið av íløguætlanini 2022
- at leingja leiguavtaluna við Bústaðirum høli í Finsen til og við mars 2022

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 314/21 Stuðul til vognrúm og skiftirúm Sankta Jósefs Barnagarður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 282/21 | 21/03318-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 322/21 | 21/03318-2 |
| 3 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 314/21 | 21/03318-2 |

**Upprunin til málið**
Sjálvsognarstovnurin Sankta Jósefs Barnagarður hevur lagt virksemi sítt um til at vera tvær barnagarðsstovur og tvær vøggustovur. Áður var stovnurin barnagarður burturav.

Orsøkin til hesa broyting er lutvíst ætlanin at niðurleggja Stella Maris Vøggustovu, har børnini vanliga fóru víðari til Sankta Jósefs Barnagarð, og lutvíst eitt ynskið hjá stovninum sjálvum um at hava børn 0-6 ár.

Stovnurin hevur fyrireikað seg til skiftið, ið eisini sæst í skipanini, tá foreldur bóka sær pláss. Neyðugt er tó at gera eitt vognrúm og skiftirúm, sum søkt verður um fígging til.

Kommunan hevur frá sjálvsognarstovninum fingið sendandi kostnaðarmeting uppá arbeiðið kr. 689.875 íroknað mvg.

Tað áliggur sjálvsognarstovninum at halda arbeiðið innanfyri henda kostnað, og ber sjálvsognarstovnurin sjálvur eina møguliga meirnýtslu. Sjálvsognarstovnurin skal senda kommununi byggiroknskap, tá arbeiðið er liðugt.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1234<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at at játta kr. 689.875 v/mvg sum stuðul til at gera vognrúm og skiftirúm í Sankta Jósefs Barnagarði av løgukontu 3175 Barnaansing L31012 Miðstovnurin, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 315/21 Fótbóltsvøllurin inni í Vika: Endurnýggjan av graslíkisvøllinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 208/21 | 21/03312-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 284/21 | 21/03312-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 318/21 | 21/03312-3 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 315/21 | 21/03312-3 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum**
**Viðv. tørvi á at skifta graslíki og stoytdoyvingarlag**
Graslíki á vøllinum úti í Vika á Argjum er frá 2009 og trongir til útskifting og sannlíkt eisini stoytdoyvingarlagið undir graslíkinum.

Verandi vøllur uppfyllir ikki galdandi vallarreglugerð hjá FSF viðv. vallarstødd v.m. Minsta stødd er 64x100 m. og tað klárar vøllurin akkurát, men frástøðurnar til girðingina eru ikki nøktandi á báðum langsíðunum. Um tað skal betrast er neyðugt at flyta vøllin 1-1,5 metrar longur móti Sandá. Hetta hevur ávísan kostna við sær.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**
Verandi ljósskipan uppfyllir ikki nútíðar krøv. Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Kannað verður um verandi fundament og mastrar kunnu brúkast heilt ella lutvíst. Um tað ber til vil tað minka um kostnaðin.

Vallarreglugerðin hjá FSF ásetur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

**Umstøður kring station**
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m. Um vøllurin verður fluttur nærri Sandá verður eisini neyðugt við at flyta og gera høgu girðingina móti Sandá av nýggjum.

**Krøv sbrt. reglugerðini um bygging og rakstur av ítróttarvøllum í Tórshavnar kommunu, har leys fylla úr plasttilfari verður brúkt**
Ásetingarnar í hesi reglugerð vilja innibera at kommunan í sambandi við hesa verkætlanina má vera klár at gera tillagingar v.m. viðv. girðingum kring vøllin, asfaltøkið v.m. Henda reglugerð er gjørd sbrt. KIMO RESOLUTION 18/01

Microplastic Pollution from Artificial Grass Sports Fields.

**Kostnaðarmeting**
Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá fyribils kostnaðarmetingum.

**Tíðarætlan**
Um undirtøka er fyri málinum verður farið víðari við fyrireikunum og er ætlandi at fara undir útboð fyrst í 2022.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at halda fram við fyrireikingunum at endurnýggja stadion á Argjum við atliti at koma aftur í nevndina í heyst við tilmæli um fígging v.m.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin er í holt við at ráðleggja verkløgini á og kring vøllin Inni í Vika. Endaliga tíðspunktið fyri at gera arbeiðini verður fastlagt í samráð við Argja bóltfelag. Kemur sannlíkt at verða gjørt antin í mai-juni ella í juni-juli. Hetta verður endaligt greitt í januar 2022.

Gjørd er ein ávegis kostnaðarmeting fyri skifting av graslíki, gerð av nýggjum stoytdoyvingarlagi, umframt flyting av vøllinum, ymiskum umstøðum kring vøllin (flyta hegn, girðingar v.m.) og dagførda ljósskipan. Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2022 eru játtaðar 10.000 tkr. á løgukontu 5775 Fótbóltsvallir. Í máli 21/01067 Ljósskipan til Ovara vøll í Gundadali verða 2.100 tkr. játtaðar til ljósskipan og tískil eru 7.900 tkr. eftir til verkløgini á Argjum.

Fyribils metingin er, at tað verður helst ov tepurt, men vil víðari fyrireikingartilgongdin geva neyvari ábending um tað. Greitt verður frá fyribils metingunum á fundinum.

Ætlanin er at dagførda ljósskipanin skal hava umleið 350 lux, t.v.s. sama sum ætlaða verkætlanin við Ovara vøll í Gundadali.

Ætlanin er at fara í eina samráðingartilgongd viðv. graslíkisveiting v.m. við støði í útboðnum í Gundadali. Hartil kemur arbeiðið at fáa bøtt um undirlendið og flutt vøllin, umframt girðingar v.m. Ætlanin er at heinta inn undirhondsboð uppá tey arbeiðini.

Ætlanin er, at krøvini til graslíkið skal lúka FIFA Quality Pro krøv, eins og hinir vøllirnir í kommununi. Tað inniber, at serlig atlit skulu takast í sambandi javnleikan á drensasfaltinum v.m.

Ætlandi verður útvegan av ljósskipan gjørd eftir sama leisti sum á Ovara vølli í Gundadali. T.v.s. heinta inn tilboð uppá projektørar frá minst teimum veitarum. El-arbeiðið verður somuleiðis gjørt sum undirhondsboð við tveimum veitarum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at flyta 7.900 tkr. av játtanini í fíggjarætlanini 2022 kontu 5775 Fótbóltsvøllir á projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu - til verkætlanina at endurnýggja graslíki, dagføra ljósskipan v.m. á vøllinum Inni í Vika
b). at heimila umsitingini at samráðast um graslíkisveitara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð (FIFA Quality Pro)
c). at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá ábøtur á drenasfaltlagið, flyting av hegni og girðingum v.m. og at gera sáttmálar í hesum sambandi.
d). at heimila umsitingini at heinta inn tilboð til nýggja ljósskipan til vøllin Inni í Vika at leggja fyri nevnd og býráð.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælunum b, c og d.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, taka undir við tilmælinum, men at graslíkisveitingin skal bjóðast út.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Tikið av skrá.

# 316/21 Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 95/21 | 21/04845-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 288/21 | 21/04845-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 324/21 | 21/04845-2 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 316/21 | 21/04845-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrstilærarin í Kaldbaks skúla og dagstovnaleiðarin á Flatnagarði hava sent Tórshavnar kommunu umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbak. Umsóknin er send í telduposti 18. november 2021.

**Lýsing av málinum**
Skúlaárið 2022/23 ynskja skúli og dagstovnur at skipa eitt forskúlalíknandi tilboð við støði í royndunum hjá Nólsoyar skúla og Látrinum við líknandi tilboði.

Í umsóknini sendur m.a.:"Sum er, hevur verið vanligt, at elsti bólkur í barnagarðinum vitjar í skúlanum nakrar ferðir. Vanligt hevur tá verið, at hesi børn vitja inn í ein tíma hjá 1.,2.- og 3. flokki. Hetta er stak hugnaligt og virðismikið, men fer av undirvísingartíðini hjá næmingunum í hesum flokkum."

Søkt verður um 12,5 tímar um vikuna til skúlan. Nólsoyar skúli hevur játtan til 10 tímar. Lønarútreiðslurnar í 5 mánaðir frá august og árið út eru uml. 105 tkr fyri 12,5 tímar um vikuna og uml. 84 tkr fyri 10 tímar um vikuna.

Skúli og dagstovnur meta, at tílíkt tilboð er til gagns bæði fyri skúla, dagstovn, børn, námsfrøðingar og lærarar.
Í stuttum er ætlanin í høvuðsheitum at hava eina forvitnisliga og spælandi tilgongd til tøl og mongdir eins og bókstavir og ljóð – umframt hetta er ætlanin, at tilboðið fylgir ársætlan skúlans, og har tað er natúrligt eisini er partur av til dømis evnisvikum og útferðum, sum skúlin skipar fyri.

Støða er ikki enn tikin til um forskúlalíknandi tilboðið skal byrja um morgunin. Um so er, verður skúlin opin frá 7:30, og børnini fara aftur í barnagarð, tá tey eru liðug í skúlanum, ella um næmingarnir skulu byrja seinni um dagin og so enda við at vera í frítíðarskúla saman við 1.-3. flokki. Um børnini møta í skúlanum um morgunin, so er neyðugt, at skúlin er opin kl. 7:30, og starvsfólk má vera á staðnum tá, tað verður so ein hálvur tími eyka hvønn dag, tí er søkt um 12,5 tímar. Um børnini møta seinni um dagin, soleiðis at tey fylgjast við børnunum í 1. og 2. fl., tá tey fara í frítíðarskúla, so er ikki neyðugt við einum hálvum tíma eyka um dagin, og í tí føri verður talan um 10 tímar.

Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu floksstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi tilboðið í Nólsoy eru lærarałøn og rakstrarjáttan pr. næm. Foreldrini rinda foreldragjald, men tað er til dagstovnin, og skúlin hevur ikki inntøkur av foreldragjaldi.

Um forskúlalíknandi tilboð verður í Kaldbaks skúla frá august 2022, verða útreiðslurnar í 2022 uml. 105 tkr til løn umframt uml. 4 tkr fyri hvørt barn. Játtan er ikki sett av í fíggjarætlanini fyri 2022 til endamálið. Endaligt uppskot til fígging verður lagt fyri nevnd í vár.

Tað eru 6 børn í Kaldbak, sum hava aldur at fara í forskúla skúlaárið 2022/23. Núverandi árgangir í skúlanum í Kaldbak eru millum og 5 næmingar.

Samstarvsavtalan millum Látrið og Nólsoyar skúla er hjáløgd, og um forskúlalíknandi tilboð verður stovnað í Kaldbak verður støði tikið í royndunum við forskúlalíknandi tilboði i Nólsoy, og tilboðið skipað eftir sama leisti.

Í umsóknini stendur, at skúlastýrið og foreldraráðið taka undir við skrivinum um forskúlalíknandi tilboð í kaldbaks skúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmekja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Samstarvsavtala um forskúlalíknandi tilboð í Nólsoy er hjáløgd

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla trivnaðarnevndini til:
a) at játta umsóknini og søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla frá skúlaárinum 2022/23
b) at málið verður lagt fyri aftur í vár við tilmæli um fígging.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini 29. november 2021.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 317/21 Keyp av trøðní á Sundsvegnum, matr. nr. 1379a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 29/21 | 21/00341-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 22/21 | 21/00341-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 328/21 | 21/00341-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 317/21 | 21/00341-1 |

**Upprunin til málið**
Eftir fund við Búnaðarstovuna um ognarviðurskiftini á staðnum, er fyrispurningur komin frá Búnaðarstovuni, um at Tórshavnar kommuna ognar sær trøðna matr. nr. 1379a og samstundis avgreiður onnur mál viðvíkjandi trøðni.

**Lýsing av málinum**
Talan er um eina leigutrøð, sum er 10.461 m$^2$ til víddar og sum er partur av Eystara Húsagarðsfesti. Trøðin liggur ovast á Sundsvegnum.

2 grundstykkir eru matrikuleraði frá trøðni og eru sethús bygd á báðar matriklarnar.

Talan er um ein pápa sum hevur ein gamlan leigusáttmála um trøðna. Hann hevur 3 synir og í leigusáttmálanum er ásett, at ein sonur hevur fingið eitt stykki og hinir báðir beiggjarnir skulu hava hvør sítt stykki, tá ið trøðin verður stykkjað út. Ein teirra hevur fingið eitt stykki, so nú er ein beiggi eftir sum skal hava eitt stykki.

Umsitingin hevur havt fleiri fundir við Búnaðarstovuna og advokatar, sum umboða synirnar hjá pápanum. Á øllum fundum er komið fram, at tað er umráðandi at allir tríggir beiggjarnir fáa líka stór stykkir.

Innkomuvegurin kemur at liggja tætt við trøðna og ein vegur, frá Innkomuvegnum til økið við Vatnaskarð, kemur at ganga beint ígjøgnum matr. nr. 1379a.

Tá Innkomuvegurin verður gjørdur, skal kommunan ognar sær trøðna til vegagerð, og tá kemur so mikið at liggja eftir av trøðni, at tað ber til at gera eina minni útstykking, har tað verða uml. 7 grundstykkir.

Kommunan eigur traðirnar báðu megin við, tað er matr. nr. 1376 og 1357a.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Størsti parturin av trøðni liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, men uml. 2.500 m$^2$ liggja í umráðispartinum D1.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um kommunan ognar sær trøðna frá Búnaðarstovuni, so skal eitt stykki býtast frá at lata til ein beiggja og eitt verandi grundstykki verður víðkað við eini marknaumskipan, sambært leigusáttmála v.m.

Restin av trøðni kann liggja til vegagerð í sambandi við innkomuvegin og seinni útstykking.

| | |
|---|---|
| Trøðin er íalt | 10.461 m$^2$ |
| Eitt grundstykki skal frábýtast, sum er uml. | 1.022 m$^2$ |
| Ein marknaumskipan uppá uml. | 472 m$^2$ |
| Rest, sum kommunan skal ognað sær | 8.967 m$^2$, harav uml. 2.500 liggja í D1. |

Vísandi til galdandi prísir hjá Búnaðarstovuni, verður mett at kostnaðurin í sambandi við keyp av lendinum verður uml. 137 kr/m$^2$, ella íalt 1.228.500 kr., umframt tinglýsing og aðrar útreiðslur, sum er uml. kr. 50.000.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 18/02514 Umsókn um keyp av uppískoytisstykki til matr. nr. 1379b av leigutrøð matr. nr. 1379a, Tórshavn.
j.nr. 19/01976 Umsókn til ummælis um keyp av uppískoytisstykki av matr. nr. 1379a til samanlegging við 1379c, Tórshavn.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Løgdeildin hevur verið við í viðgerðini av málinum.

**Skjøl**
Leigusáttmáli til trøðna
Avgerð í sambandi við kæru um at fáa grundstykki burturav trøðni
Kort yvir trøðna, har framtíðar vegir eru við
Uppskot til útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at kommunan fer í samráðingar við Búnaðarstovuna um treytir og kostnað fyri at kommunan ognar sær matr. nr. 1379a til framtíðar vegagerð og útstykking og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti.**

Búnaðarstovan hevur sent kommununi tilsøgn um keyp av lendi matr.nr. 1379a, Tórshavn. J. nr. 21/00341-11

Keypsprísur íroknað tinglýsing og sakargjøld er kr. 1.041.404,73

<table>
<tr><td rowspan="2">Býráðsfundur<br>16. desember 2021</td><td>Blað nr.: 1243</td></tr>
<tr><td>Formansins merki:</td></tr>
</table>

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa matr.nr. 1379a, Tórshavn fyri 1.041.404,73 kr. fíggjað av konto 6175. ( Keyp/sølu )

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 318/21 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 250a, 250b, 250c, 250d, 250e, 250f og 250g á Argjum til ummælis og keypa av økið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 112/21 | 21/00688-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 217/21 | 21/00688-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 296/21 | 21/00688-6 |
| 4 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 327/21 | 21/00688-6 |
| 5 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 318/21 | 21/00688-6 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni.

**Lýsing av málinum**
Umhvørvisstovan biður um ummæli til marknaumskipan, umsóknin er í sambandi við eitt arvaskifti.

Umsóknin frá arvingunum kann ikki øll viðmælast, so Advokaturin, sum umboðar familjuna, hevur verið hjá Umhvørvisstovuni og fingið at vita hvat hann kann fáa loyvi til, sí kort j.nr. 21/00688-8

Tað sum kann viðmælast er:

- Matr. 250a letur umleið 33,6 fermetrar til matr. 250e (merkt 1)
- Matr. 250a letur umleið 27,2 fermetrar til matr. 250f (merkt 2)
- Matr. 250c letur umleið 27 fermetrar til matr. 250d (merkt 3)

Tað sum ikki kann viðmælast er:
Økini norðureftir kann ikki viðmælast, av tí at hetta er lagt av til framtíðar veg til økið omanfyri, sum liggur í umráðispartinum A1, byggiøki (merkt 4)

Harumframt søkja arvingarnir eisini Tórshavnar kommunu um at keypa tríggjar geirar av vegnum litra a á Argjaboða.

Søkt verður um at keypa (merkt 5):

- Ein geira uppá 30,7 fermetrar av litra a til at leggja saman við matr. 250c.
- Ein geira uppá 3,5 fermetrar av litra a til at leggja saman við matr. 250d
- Ein geira uppá 47,8 fermetrar av litra a til at leggja saman við matr. 250b.

Tað er ikki ráðiligt at selja av litra a, vísandi til at tað møguliga skal byggjast íbúðir longri úti á Argjaboða, og um vegurin verður dagførdur..

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir tað ikki vera ráðiligt at selja burtur av vegnum (litra a), fyrr enn vegurin er dagførdur. Víst verður til ætlanina at byggja íbúðir longri úti á Argjaboða.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Onki mál sum hevur týdning

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar viðmerkingar.

**Skjøl**
21/00688-8 kort til málið.
21/00688-9
váttan til vegatkomu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at nevndin viðmælir marknaumskipan av økjum merkt 1, 2 og 3 á korti j.nr. 21/00688-8, og ikki at viðmæla restina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Formaðurin biður um at fáa málið á skrá aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti.**

Umsitingin hevur fingið til vega meting av virðinum á lendinum,, ið samtykt er at selja umsøkjarum, sí j.nr. 21/00688-18.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla til at selja umsøkjarum lendi til mettan prís áljóðandi 427,- kr.m2.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 319/21 Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1225q, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.11.2021 | 76/21 | 21/03116-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 329/21 | 21/03116-8 |
| 3 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 319/21 | 21/03116-8 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um yvirtøku av vegi.

**Lýsing av málinum**
Eigarin av matr. nr. 1225q,Tórshavn hevur við umsókn vent sær til kommununa við ynski um, at kommunan yvirtekur matrikulin 1225q, Tórshavn. Talan er um tveir vegalutir, sum hava sama matr. nr. 1225q, Tórshavn. Tann ovari vegaluturin av matr. nr. 1225q, Tórshavn er 1071 m² til støddar. Tað niðari vegaluturin av matr. nr. 1225q, Tórshavn er 676 m² til støddar. Kommunan yvirtekur bara ovara vegalutin. Tann niðari vegaluturin verður ikki yvirtikin fyrrenn atkomuviðurskiftini eru endaliga komin uppá pláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongin viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og sýnað vegin. Niðurstøðan er, at vegurin er í góðkendum standi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort – matr. nr. 1225q, Tórshavn, j. nr. 21/03116-10

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒
Eigarin av matr. nr. 1225q, Tórshavn ber útreiðslurnar í sambandi við yvirtøkuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur tann ovara vegalutinum stødd 1071 m² av matr. nr. 1225q, Tórshavn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 320/21 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 244/21 | 21/02624-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 330/21 | 21/02624-2 |
| 6 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 320/21 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 15. november 2021, kl. 12 var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá Jóan Petur Vang áljóðandi kr. 1.586.000 við Kontrast, sum ráðgeva.
Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 350,00 fyri teir 4.480 fermetrarnar, ið er júst sama upphædd sum kostnaðarmetingin fyri lendið frá útboðstilfarinum. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskoti og við eini treyt um at graviloyvið verður givið soleiðis, at grevstur longu kann setast ígongd 1. mars 2022. Um hetta kann lata seg gera, fer byggingin ígongd pr. 1. juni 2022 og varðar uml. í 22 mánaðir, sí fylgiskjal *Upplegg 1.1.pdf.*

Ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið skal gerast, ið loyvir bygging sambært uppskotinum. Hetta merkir, at áðrenn graviloyvi kann gevast, skal serstaka byggisamtyktin liggja til almenna hoyring í seks vikur, fyri síðan at góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Ein tílík tilgongd plagar at taka millum ein til tríggjar mánaðir. Tí fer tað ikki at bera til at ganga treytini á møti og ein samráðing skal tí takast upp við tilboðsgevaran.

Talan er um níggju raðhús og fýra punkthús við tveimum íbúðum í hvørjum.
Støddirnar á raðhúsunum eru 125 fermetrar deilt yvir tvær fullar hæddir, umframt p-kjallara. Punkthúsini hava tvær íbúðir, ið eru ávikavist 75 og 100 fermetrar.

Búeindirnar hava nøktandi p-pláss. Tó ynskir kommunan eina øðrvísi skipan av teimum, soleiðis at fleiri verða á felagsøki, til tá føðingardagar o.a. er í økinum.

Økið er væl skipað við varðveittum bøgarði. Umsitingin metir tað sum eina styrki fyri dámin í økinum, at punkthúsini standa forskotin. Hetta er ikki ein vanligur háttur at staðseta hús á bygd, men hetta gevur meining í mun til gjøgnumtrek og sólargang.
Prinsippið við at byggja høgt upp móti hamrum er nakað, ið kommunan ynskir at síggja meiri av. Bygningarnir taka ikki útsýni umframt at hamarin skapar lívd.

Sum nevnt skal nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast. Frávik skal gerast í nýggju serstøku byggisamtyktini, ið loyvir íbúðarbygging. Hæddin er hægri enn tann, ið er loyvd í A1 økjum og tí skal frávik eisini gevast til hetta. Orsøkin til høgu byggingina er, at parkering er undir raðhúsabygningunum. Hetta hevur nakrar fyrimunir við sær, ið kommunan átti at stuðla. Lendisnýtslan verður meiri effektiv og tann parturin, ið annars hevði blivið asfalteraður til p-pláss, kann blíva lagdur sum t.d. grønt øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- Jóan Petur Vang fær í boði at keypa lendið til íbúðir og raðhús fyri tilboðsupphæddina kr. 1.586.000
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c í Kollafirði í samráð við keyparan av lendinum
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at byggingin skal fara í gongd innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 321/21 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 4a til A3 øki, í smb. við útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 207/21 | 21/04189-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 301/21 | 21/04189-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 256/21 | 21/04189-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 321/21 | 21/04189-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur fólkavøkstur heldur fram í kommununi og tískil er tað týdningarmikið, at kommunan, við síðuna av tí privatu vinnuni, eisini heldur fram at standa á odda fyri at veita borgarum bústaðir.
Kommunuætlanin vísir á góð lendi til býarvøkstur, m.a. oman fyri Argjahamri. Samtykt er at fara í gongd við eina ætlan at skipa økið bæði við set-, raðhúsum og íbúðum, umframt øki til møguliga stovnsbygging, sí mál nr. 21/01777 og kortskjal *Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.*

**Lýsing av málinum**
Á býráðsfundi hin 30. september 2021 bleiv einmælt samtykt at játta pening til at fyrireika lendi oman fyri Argjahamri til byggibúning til bústaðir.

Alt økið liggur sum er í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað landbúnaði, sí kortskjal *Áðrenn broyting*.

Fyri at kunna byggja bústaðir á lendinum, skal byggisamtyktin broytast. Avgerð er ikki endaliga tikin um hvussu stór grundstykkini skulu vera, hvussu býtið av bústaðarsløgum skal verða og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Heldur ikki er avgjørt hvør stovnur, afturat verandi skúla og dagstovni, skal byggjast í økinum, men væntast kann, at tørvur verður á einum røktarheimi við røktaríbúðum í framtíðini. Fyri at hava møguleika fyri at skipa økið, við omanfyri nevndu eindum, er neyðugt at broyta økið til A3 øki í almennu byggisamtyktini sí kortskjal *Eftir broyting*, og tá nærri ætlanir fyriliggja, gera eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
§7, stk. 1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

§7, stk. 2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01777 – Útstykking oman fyri Argjahamar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur í 4. Grundumráði, og skal broytingin tí góðkennast av friðingarmyndugleikanum.

| | Býráðsfundur<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1253<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Skjøl**
21/04189-3 Áðrenn broyting
21/04189-3 Eftir Broyting
21/01777-3 Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/04189-7 Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd.
21/04189-7 26.10.2021
21/04189-7 Eftir broyting 08.12.2021

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært ætlanini fyri økið, sum er í umbúna, frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at broyta byggisamtyktina fyri økið frá 4. grundumráði til A3 øki og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við staðseting av bústøðum umframt vegalinjuni til nýggju útstykkingina á Argjahamri sí korskjal *Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd*. Hetta merkir, at broytingarnar í almennu byggisamtyktini, ið blivu samtyktar 25. novembur 2021, skulu tillagast

Lagt verður upp til at gera eitt øki við raðhúsum beint oman fyri verandi raðhúsaøki og tí skal ein rond av økinum, ið upprunaliga bleiv samtykt at broytast til D3 øki, sí kortskjal *26.10.2021*, broytast til A3-øki til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, sí kortskjal *Eftir broyting 08.12.2021.*

Byggisamtyktin verður tillaga í økinum matr. 256, 4gr og 4gp, soleiðis at hon fylgir linjuføringini av vegum og møkrum í økinum. Harumframt er ásetingini fyri norðara endan av útstykkingini víðka eitt vet eystureftir soleiðis at hon passar til tillagaða uppskotið, ið umsitingin hevur arbeitt víðari við, sí korskjal *Utstykking omanfyri Argjahamar_ Støðumynd*.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært tillagaða kortskjali *Eftir broyting 08.12.2021* og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt**.**

# 322/21 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2020 | 47/20 | 20/00719-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 187/20 | 20/00719-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2020 | 211/20 | 20/00719-6 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 241/20 | 20/00719-6 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 57/21 | 20/00719-6 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 123/21 | 20/00719-6 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 203/21 | 20/00719-6 |
| 8 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 258/21 | 20/00719-6 |
| 9 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 322/21 | 20/00719-6 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 259/21 | 20/00719-6 |

**Upprunin til málið:**
Á býráðsfundi hin 23. mai 2019 varð samtykt at geva tilsøgn til, at vindmyllur kunnu setast upp í Hoyvíkshaga, m.a. treytað av at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Útbygging av grønari orku minkar um brúk av dálkandi orkukeldum og mett verður, at tað er hóskandi at seta fleiri vindmyllur í øki, sum frammanundan hevur vindmyllur.

Ætlanin er at seta 6 vindmyllur upp, og hava hesar eina hædd á uml. 79 m upp til tornið, og veingjabreiddin er uml. 82 m. Soleiðis eru tær nakað hægri enn t.d. vindmyllurnar í Húsahaga, sum eru uml. 67 m høgar.

Økið, sum ætlanin er at seta vindmyllur á, er sambært Kommunuætlanini ikki partur av býarvakstrarøki fram til 2030.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 4. Grundumráði, sum m.a. hevur hesar ásetingarnar:

*§ 26, stk. 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*

*Stk. 1, pkt. e. Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.*

*Pkt. f. Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 25, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi at reisa vindmyllur í Hoyvíkshaganum (Gellingarklett) tilhoyrandi Hoyvík, matr. nr. 139a,* journal nr. 19/01208

- *Lendi til vindmyllulund,* journal nr. 19/01609
- *Umsókn um byggiloyvi til smáttur á matr. nr. 1175l, Tórshavn,* journal nr. 20/02026

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Greiningar vísa, at partur av byggisamtyktarøki A1, D1 og F øki liggur innanfyri økið, har ljóðstøðið sambært ásetingunum ikki hóskar til bústaðabygging, sí appilsingula ringin á s. 1 í viðhefta skjali *Umhvørvisdálking*.

Kommunan hevur ikki í løtuni ítøkiligar ætlanir um at byggja bústaðir á hesum A1 økinum, men innan 20 ár er ikki óhugsandi, at bygt verður á hesum øki.

Hinvegin, so eru ítøkiligar ætlanir við matr. nr. 1175l, sum er partur av F økinum, sum liggur innanfyri appilsingula markið. 2. juni 2020 móttók kommunan umsókn um byggiloyvi til smáttur og kampingøki á matriklinum.

Staðsetingin av vindmyllunum kann ikki endaliga staðfestast, fyrr enn boriroyndir eru gjørdar í økinum og verður mælt til, at umsøkjari leggur seg eftir, at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og flytur vindmyllurnar soleiðis, at F øki ikki verður órógvað av vindmyllunum.

Ein lítil partur av D1 økinum liggur somuleiðis innanfyri óljóðsmarkið, men mett verður, at útbyggingin av grønari orku vigar tyngri enn atliti til at verja ítøkiliga D1 øki við Villingadal.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska deild:

- Møguleikin fyri óhappi, og at dálking kann ávirka vatngóðskuna í byrgingini í Havnardali og Villingadali er lítil. Vandin er størri í byggifasuni, enn tá projektið er liðugt. Vandin liggur í, at olja so ella so kann setast oman í vatnbrunnin. Atlit mugu takast til tey akfør og maskinur, sum koma at arbeiða í økinum, og tiltøk mugu vera klár, um óvæntað dálking hendir.

Málið er til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum og hjá Landsverki.

Málið varð sent til hoyringar hjá SEV. Teir høvdu viðmerking um at serstaka byggisamtyktin somuleiðis átti at fevnt um ætlaðu vindmyllulundina hjá SEV. Hendan ætlanin er tó ikki komin eins langt og omanfyri nevnda vindmylluætlan, og tískil verður mælt til at bíða við at gera serstaka byggisamtykt fyri ætlanina hjá SEV.

**Skjøl**

- *Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga,* journal nr. 20/00719-19
- *Umhvørvisdálking,* journal nr. 20/00719-20

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga, treytað av:

- loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk
- at ljóðviðurskiftini órógva byggiøkini minst møguligt og at vindmyllurnar verða fluttar soleiðis, at F økið ikki verður órógvað.
- og beina málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2020:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð í byggi- og býarskipanarnevndini, eru nýggjar upplýsingar komnar í málinum.

Upplýsingarnar eru viðvíkjandi óljóðsmátingunum, og hvussu trupulleikarnir, við at partur av kampingøkinum á F økinum liggur innanfyri markið fyri óljóði, kunnu loysast.

Tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar bygdar, verður mælt til at óljóðsmátingar verða gjørdar, fyri at staðfesta veruliga óljóðstøðið í økinum. Um mátingarnar vísa, at óljóðstøðið í F økinum er ov høgt, verður mælt til at vindmyllurnar, ið eru atvoldin til ov høga óljóðstøðið, steðga ella verða niðurreguleraðar tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt. Talan er um lutfalsliga fáar tímar á árinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri vindmyllur treytað av:

- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini og Landsverk.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum er bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga varð góðkend av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum hin 12. februar 2021. Síðani hevur umsøkjari søkt um loyvi at seta upp eitt annað slag av vindmyllum, sum er størri og effektivari – framleiða uml. 45% meira orku á sama øki og við somu staðseting av vindmyllum. Ein tílík broyting av vindmylluslagi, krevur eina broyting av serstøku byggisamtyktini fyri økið.

Hetta nýggja slagið av vindmyllum er væl størri enn tær í fyrru ætlanini og fer hæddin upp til tornið úr 79 m til 92 m og veingjabreiddin fer úr 82 m til 117 m. Umsøkjari hevur sent visualiseringar av nýggju vindmyllunum frá somu staðsetingum sum tær í fyrru ætlanini, soleiðis at til ber at meta um visuellu broytingarnar, sí skjal *Visualiseringar – Enercon og Vestas*. Tað sæst sjálvsagt, at nýggju vindmyllurnar eru størri og fara tær at verða sjónligar frá størri parti av býnum, men við støði í innsendu visualiseringunum verður ikki mett, at broytingin av vindmylluslagi/støddini hevur stóra sjónliga ávirkan á umhvørvið, sæð frá útvaldu støðunum í býnum.

Umsøkjari hevur sent nýggjar simuleringar av óljóðinum, ið stendst av vindmyllunum. Hesar vísa, at tað ikki er stórur munur, á óljóðinum frá vindmyllunum í upprunaligu ætlanini, og nýggju vindmyllunum. Sambært umsøkjara, kemst hetta av, at veingirnir á nýggju vindmyllunum eru formaðar annarleiðis.

Umhvørvisstovan hevur lagt góðkenningina av Umhvørvisárinsmetingini og Umhvørvisgóðkenningina til hoyringar.

Broytingin av vindmylluslagnum krevur eina nýggja góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini, og hevur nevndin fingið málið til viðgerðar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna broytingina av serstøku byggisamtyktini fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga smb. skjalinum *Broytingaruppskot*, treytað av:

- Loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.
- At ljóðviðurskiftini verða kannaði, tá vindmyllurnar eru settar upp og smátturnar í F økinum eru bygdar. Um tað vísir seg, at óljóðstøðið er ov høgt í økinum, skulu viðkomandi vindmyllur steðgast ella niðurregulerast tey tíðspunkt, tá óljóðið er ov høgt.

Og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin kannar við atliti til at vindmyllurnar eru staðsettar í einum tilrenningarøki, har drekkivatn verður savnað, um staðsetingin kann hava ávirkan á drekkivatnið í kommununi.

Kári Johansen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Síðani umsøkjari søkti um at broyta vindmylluslagið til eitt størri slag, Vestas V-117, hevur eitt samskifti verið við Yvirfriðingarnevndina um loyvi til hesar, og 14. okt. 2021 gav Yvirfriðingarnevndin loyvi til at seta upp vindmyllur av slagnum Vestas V-117, sí skjal *2019-32, afgørelse af 14.10.21*.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 12. apríl 2021, at umsitingin skuldi kanna, við atliti til at vindmyllurnar eru staðsettar í einum tilrenningarøki, har drekkivatn verður savnað, um staðsetingin kann hava ávirkan á drekkivatnið í kommununi. Harumframt hava nakrir borgarar vent sær til kommununa við síni stúran um hetta sama – at vindmyllurnar fara at standa í tilrenningarøki til drekkivatngoymsluna. Í hesum sambandi hava teir víst á kanningar frá Noregi og Skotlandi sum vísa, at vandin fyri dálking av drekkivatninum og vistskipanini er sera stórur, og tess størri vindmyllurnar eru, tess meira slit er á veingjabløðini. Slitið førir við sær, at smáir bitlar koma frá vindmylluveingjunum, sum síðani kunnu enda í vatngoymslunum í Havnardali og Villingadali.

Umsøkjari hevur sent nærri frágreiðingar frá Vestas og frá Jákup Mørkøre, kemiverkfrøðingi, sí viðhefta skjal *Svar til kæru av umhvørvisgóðkenningini* og frágreiðing um tilbúgvingina, um lekar skuldu verið, sí skjal *Svar frá SPF Vindrøkt – Mál nr. 20-00719.pdf,* har pástandirnir verða afturvístir.

Harumframt eru umhvørvisgóðkenningin og góðkenningin av umhvørvisárinsmetingini vorðnar dagførdar í mun til nýggja vindmylluslagið, sí skjøl *Dagførd góðkenning av umhvørvisárinsmeting-Vindmyllur við Gellingarklett* og *Dagførd Umhvørvisgóðkenning – Vindmyllur við Gellingarklett*. Í dagføringini vísir Umhvørvisstovan á, at tey meta ikki, at vandi er fyri álvarsamari dálking av Epoxy og bisphenol A. Treytir verða settar um viðlíkahald av vindmylluveingjunum og um at kanningar av vatni fyri innihaldi av bisphenol A verða gjørdar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, vísandi til frágreiðingarnar frá umsøkjara og at verkætlanin hevur fingið umhvørvisgóðkenning, umframt at loyvið er fingið frá Yvirfriðingarnevndini, at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt um vindmyllur í Hoyvíkshaga smb. skjalinum *Broytingaruppskot* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein taka undir við tilmælinum og at fáa fleiri upplýsingar um vindmyllurnar hava nakra ávirkan á drekkivatnið áðrenn býráðsfundin.

Jákup Dam og Ruth Vang taka undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum fyrr enn eitt notat fyriliggur.

**Ískoyti:**
Umframt tær frágreiðingar, ið vístar verða á omanfyri, hevur umsitingin umrøtt møguligu ávirkanina vindmyllurnar hava á drekkivatnið innanhýsis, og við Umhvørvisstovuna.

Umhvørvisstovan, sum er eftirlitsmyndugleiki á økinum, vísir á, at tey í umhvørvisgóðkenningini hava viðgjørt møguligu dálkingina av vindmyllunum á drekkivatnið, sí skjal *Dagførd Umhvørvisgóðkenning – Vindmyllur Gellingarklettur.pdf.* Har verður millum annað skrivað: "*Umhvørvisstovan metir ikki, at vandi fyri álvarsamari dálking verður av hesum, tí at vindmyllurnar eru útgjørdar við eini eyka trygging ímóti sliti og tí at regluligt viðlíkahald er við vindmyllunum. Treytir verða settar um viðlíkahald av vindmylluveingjunum og um kanningar av vatni fyri innihald av bisphenol A.*"

Vindrøkt hevur sum tann einasti veitarin av vindmyllum fingið treytir settar í Umhvørvisgóðkenningina um undankanningar av nøgdini av Bisphenol A í vatninum í økinum rundanum, umframt at sama kanning skal gerast uml. 3 ár eftir, at vindmyllurnar eru tiknar í nýtslu, sí pkt. 7.5.3 og 7.5.4 í Umhvørvisgóðkenningini. Tá Umhvørvisstovan hevur fingið frágreiðing um hesar kanningarnar, tekur Umhvørvisstovan støðu til, um neyðugt er við fleiri kanningum, tiltøkum ella bøtandi atgerðum.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur umbiðið eina kanning og lýsing av verandi vitan um møguliga dálking frá vindmyllum og vindmylluveingjum, og evnunum í hesum. Hendan frágreiðingin verður væntandi klár í januar 2022. Harumframt mælir umsiting til, at hesar ásetingarnar verða settar í serstøku byggisamtyktina:

*"Neyðug atlit skulu takast til at drekkivatnið ikki verður dálkað.*
*Kommunan kemur at seta krav um tilbúgvingarætlan í sabm. Við vindmyllulundina.*
*Tilbúgvingarætlanin skal vera í samsvar við ta tøkni, sum skal brúkast."*

Havandi í huga, at verkætlanin hevur fingið Umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni (við treytum um at kanna vatnið, o.g.), sum er hægsti eftirlitsmyndugleiki á økinum, umframt nýggju ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini verður tað mett ráðiligt at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Hoyvíkshaga umframt at hesar ásetingar verða settar í serstøku byggisamtyktina:
*"Neyðug atlit skulu takast til at drekkivatnið ikki verður dálkað.*
*Kommunan kemur at seta krav um tilbúgvingarætlan í samb. Við vindmyllulundina.*
*Tilbúgvingarætlanin skal vera í samsvar við ta tøkni, sum skal brúkast."*

Og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu:Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Birita Baldvinsóttir Iversen, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Kári Johansen.

# 323/21 Nýggj útstykking á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.11.2021 | 227/21 | 21/04063-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | | | 21/04063-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 331/21 | 21/04063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 323/21 | 21/04063-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at Tunnilsfelagið nýtir matr. nr. 7a til at lempa grót frá Sandoyartunnlinum á, so sær kommunan møguleikar í at gagnnýta økið, nú so stórur tørvur er á øki til bústaðir og vinnuligt virksemi.

Tunnilsfelagið hevur játtað, at kommunan yvirtekur tær avtalur felagið hevur við festaran, tá teirra virksemi er liðugt og fundur hevur verið millum umboð fyri Tórshavnar kommunu, Tunnilsfelagið og Búnaðarstovuna, har kommunan kunnaði Búnaðarstovuna um møguligu útstykkingarnar á Velbastað, har grótið verður deponerað.

**Lýsing av málinum**
Talan er um økið nakað vestan fyri bygdina, har vegurin "Úti í Dølum" kemur niðan á Kirkjubøarvegin. Ætlanin er, at økið vestan fyri vegin verður lagt sum SA bústaðarøki og økið eystan fyri vegin til SB2 vinnuøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað, sí kortskjal *Eftir broyting*.

SA bústaðarøki:
SA bústaðarøki á Velbastað loyva sethúsum, tvíhúsum og eftir serloyvi raðhúsum, íbúðum og tílíkum. Serloyvi kann somuleiðis gevast til handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til.

Bústaðarøki liggur nakað frá bústaðarøki á Velbastað annars, og fer tí at virka sum ein nýggjur býlingur í bygdini, og skulu atlit takast til hetta, tá økið verður skipað. Við tíðini ber til at leggja nýggj bústaðarøki millum bygdina, og nýggja býlingin, soleiðis at hesi verða knýtt saman.

SB2 vinnuøki:
SB2 vinnuøki á Velbastað loyva vinnuvirkjum, verksmiðjum og tílíkum virkjum í umhvørvisflokki 2-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Frástøða frá tílíkum virkjum til bústaðir skal vera uml. 20-100 m. Økið er skipað soleiðis, at frástøðan frá SA økinum til SB2 økið er 50 m.

Stórur tørvur er á vinnustykkjum í kommununi, og tættleikin til høvuðsstaðin, umframt at økið liggur upp at landsvegi, sum í framtíðini fer at knýta syðra part av Føroyum saman við restini av Føroyum ger, at hetta hóskar seg væl sum vinnuøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri SA øki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús og tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast raðhús, íbúðir og tílíkir bústaðir fyri eitt húski.
  Í sambandi við bústaðarøki kann byggisvaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki spillir dámin á økinum.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

Ásetingar fyri SB2 øki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

- Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
- Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað er góðkent í býráðnum og liggur til almenna hoyring. Broytingar, sum lýstar eru í hesum málinum, eru treytaðar av, at endurskoðanin av byggisamtyktini fyri Velbastað verður endaliga góðkend.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Økið liggur fram við landsvegi, og skal tí til hoyringar hjá Landsverk. Fráleiki á 25 m frá miðju á vegnum er løgd inn í byggisamtyktina.

**Skjøl**
- *Áðrenn broyting,* journal nr. 21/04063-2.
- *Eftir broyting,* journal nr. 21/04063-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- Broyta serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað sambært kortskjalinum Eftir broyting.
- Heimila umsitingini at fara undir arbeiðið at gera skipanaruppskot fyri økið.
- Heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Annika Olsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

| | Býráðsfundur<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1263 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 324/21 Umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 722c, Tórshavn frá A1 til 2. grundumráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 177/20 | 20/03223-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 191/20 | 20/03223-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 242/21 | 20/03223-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 324/21 | 20/03223-1 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 722c, Tórshavn hevur sent umsókn um at broyta almennu byggisamtyktina fyri matrikulin frá A1 øki í 3. grundumráði, til 2. grundumráði.

Markið millum A1 øki og 2. Grundumráði gongur ígjøgnum matrikulin, og í umsóknini verður ført fram, at hetta kann vera ein ábending um, at linjan millum økini ikki er løgd heilt tilætlað, sí skjal *Frá A1 til grundøki 2.pdf.* Umsøkjarin metir, at tað vil viðføra eina meira greiða og reina linju millum grundumráðini, um byggisamtyktin verður broytt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Størsti parturin av matr. nr. 722c liggur í A1 øki, meðan ein lítil geiri liggur í 2. grundumráði. Mett verður, at grundstykkið natúrliga hoyrir grannalagnum "í aðru rekkju" til og at tað tískil ikki er rætt, at broyta tað til 2. Grundumráði. Grundstykkið hevur atkomu frá sama vegi sum hini grundstykkini í A1 økinum, og er hetta somuleiðis við til at styrkja um tilknýti til A1 øki.

Stórur munur er á ásetingunum fyri A1 øki og 2. Grundumráði. Nevnast kann t.d. at byggistigið er 0,2 hægri í 2. Grundumráði og at byggjast kann ein 1 metur hægri í 2. Grundumráði enn í A1 øki. Somuleiðis er munur á ásetingunum um nýtslu fyri økið, meðan A1 øki einans loyvir sethúsabygging, so loyva ásetingarnar fyri 2. Grundumráði eisini miðstaðabygging, so sum handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar o.t.

Um umsóknin verður gingin á møti, verður dámurin á økinum og grøna geiranum sum gongur oman móti Sjónleikarhúsinum munandi broyttur.

Ognin, sum stendur á matr. nr. 722c, er skrásett við høgum varðveitingarvirði 3 í Tórshavnar býaratlasi. Bygningar við varðveitingarvirðunum 1-3 eru bygningar, sum í sínum byggilistarliga, mentanarsøguliga og handverksligu tilvirking eru framúrskarandi dømi av sínum slagi. Hetta kunnu eisini vera bygningar, sum við sínari staðseting eru ómissandi fyri heildina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 2. grundumráði eru m.a.:
- 2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabygging má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,7. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 2 vísir.
- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingar fyri A1 øki í 3. grundumráði eru m.a.:

- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggvaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.
- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar býaratlas frá 2007 er ein skráseting av varðveitingarverdum bygningum, ið vera hildnir at vera bygdir fyri 1958, og býarumhvørvum í Havn. Atlasið er eitt amboð at skapa yvirlit og geva okkum eina fatan av teimum býarvirðum, sum býarmenningin eigur at taka hædd fyri. Tó at býaratlasið ikki hevur nakra sjálvstøðuga heimild, eru skrásetingarnar og frágreiðingarnar av økjunum eitt amboð, ið kommunan nýtir í býarskipanini í og rundan um økini, ið eru mett við serligum varðveitingarvirði fyri býin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Frá A1 til Grundøki 2.pdf,* journal nr. 20/03223-2.
- *Kort,* journal nr. 20/03223-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti, grundað á:

- Grundstykkið hoyrir natúrliga grannalagnum í A1 økinum til.
- Ynskið er at varðveita dámin og nýtsluna av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Eftir fundin í byggi- og býarskipanarnevndini hin 9. september 2020, varð umsøkjarin biðin um at senda eina útgreinaða umsókn.

24. september 2020 mótók umsitingin eina útgreinaða umsókn, sí skjal *útgreinað umsókn*, og í henni stendur m.a.:

1. Tað, at grundstykkið liggur í bæði A1 og 2. Grundumráði kundi títt uppá, at linan ikki er løgd so skynsamt. Tískil er tað ikki annað enn rímuligt, at kunna velja, tað eina fram um hitt.
2. Allir grannar liggja í 2. Grundumráði, og ynskja somu treytir sum teir.
3. Tvey húsarhald í húsinum og er ynski um at hava møguleikan at víðka um húsini, og eru fleiri møguleikar, um ognin liggur í 2. Grundumráði.
4. Ynski um at fullføra dreymin um eini fullkomin og stílrein funkishús.

Til hetta hevur umsitingin fylgjandi viðmerkingar:

Ad. 1. Tað, at ein matrikul liggur í tveimum, ella fleiri ymiskum byggisamtyktarøkjum, er ikki óvanligt. Almenna byggisamtyktin er frá 1972, og vóru ikki somu teknisku hentleikar, sum vit hava í dag. Meginreglan er, at matrikulmørk og byggisamtyktarmørk skulu fylgjast, men tó eru ymisk viðurskifti sum gera, at hetta ikki altíð er galdandi. Hetta kann t.d. vera broytingar av matrikulmørkum, ymisk lendisviðurskifti, digitaliseringar, broytingar av býarplanum.
Nevnast kann, at tað eru tveir mátar at viðgera byggimál, har matrikulin liggur í tveimum byggisamtyktarøkjum. Ein er, at tað øki, sum fyllir meir á matriklinum er avgerandi fyri, hvussu málið verður viðgjørd. Viðvíkjandi matr. nr. 722c, so fyllir A1 øki uml. 80% og 2. grundumráði uml. 20%. Hin møguleikin er at viðgera byggimálið sambært reglunum sum eru galdandi fyri økið, ið sjálv byggingin verður á. Aftur í hesum førinum hevði tað verið ásetingarnar fyri A1 øki, ið høvdu skula verða fylgdar.

Ad. 2. Grannarnir eystanfyri ognina liggja í 2. Grundumráði og grannarnir vestanfyri ognina liggja í A1 øki. Sum áður nevnt, so verður mett, at grundstykkið natúrliga hoyrir grannalagnum "í aðru rekkju" til og at tað tískil ikki er rætt, at broyta tað til 2. Grundumráði. T.d. hoyra matr. nr. 722c, 722d og 722a natúrliga saman og liggja innanfyri sama garð og liggja matr. nr. 722d og 722a í A1 øki.

Ad. 3. Sum áður nevnt, so verður mett, at matr. nr. 722c natúrliga hoyrir A1 økinum til. A1 øki eru fyrst og fremst ætlaði stakhúsum til eitt húski, við møguleika fyri eini minni, sekunderari íbúð. Tískil verða atlit ikki tikin til, at tvey húski skulu húsast í húsinum.

Ad. 4. Almenna byggisamtyktin hevur ikki ásetingar um, hvønn stíl møguligt er at byggja í hvørjum øki.

Víst verður enn einaferð á at ognin, sum stendur á matr. nr. 722c, er skrásett við høgum varðveitingarvirði 3 í Tórshavnar býaratlasi.
Bygningar við varðveitingarvirðunum 1-3 eru bygningar, sum í sínum byggilistarliga, mentanarsøguliga og handverksligu tilvirking eru framúrskarandi dømi av sínum slagi. Hetta kunnu eisini vera bygningar, sum við sínari staðseting eru ómissandi fyri heildina. Í Tórshavnar býaratlasi verður eisini nevnt, at Tinghúsvegurin er eitt býarumhvørvi, ið eigur at verða varðveitt, og er útstykkingin fram við Tinghúsvegnum ein av elstu sethúsaútstykkingunum í Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsóknini á møti, grundað á:

- Grundstykkið hoyrir natúrliga grannalagnum í A1 økinum til.
  Ynskið er at varðveita dámin og nýtsluna av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass, atkvøður blankt.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum - fyri hann luttók Bergun Kass.

**Ískoyti:**

Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hevur ynskt málið á skrá.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa til tilmælið omanfyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at broyta byggisamtyktina soleiðis, at alt matr. nr. 722c og partur av matr. nr. 722a verða í 2. grundumráði.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 blokum og ongari ímóti**.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

## 325/21 Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 251/20 | 20/04650-3 |
| 2 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 331/20 | 20/04650-3 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 17/21 | 20/04650-3 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 60/21 | 20/04650-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 97/21 | 20/04650-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 128/21 | 20/04650-3 |
| 7 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 149/21 | 20/04650-3 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 204/21 | 20/04650-3 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 257/21 | 20/04650-3 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 245/21 | 20/04650-3 |
| 11 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 325/21 | 20/04650-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 261/21 | 20/04650-3 |

**Upprunin til málið:**
Eigarin av matr. nr. 1175i, Tórshavn søkir um at broyta byggisamtyktina fyri økið frá B4 vinnuøki til øki, har loyvt er at byggja íbúðir. Í umsóknini stendur, at ynskið er at byggja íbúðir til fólk, ið ynskja sær ein góðan bústað á ellisárum, sí skjal *Økið*.

Hetta er ikki í tráð við ásetingarnar fyri økið, og tískil er neyðugt at broyta byggisamtyktina, um tað skal lata seg gera. Umsøkjari ynskir, at ein tílík broyting viðførir at byggjast kann við einum høgum nýtslu- og byggistigi og í trimum hæddum. Tað kundi t.d. verið í einum A3 øki, við eini serstakari byggisamtykt, ið skipar økið til íbúðarbygging ella í einum A2 øki, sum er ætlað bústaðarbygging í fleiri hæddum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 1175i liggur út móti Húsahaga. Ognin liggur norðanfyri Oyggjarvegin og eru eingir bústaðir staðsettir hesumegin Oyggjarvegin. Býarskipanarliga er tískil talan um eitt býarmark, ið verður flutt.

Í Kommunuætlanini 2020 er Húsahagi útnevndur sum býarvakstrarøki, sí skjal *Brot úr Kommunuætlanini 2020*, men hevur hetta økið eina lága raðfesting. Um Húsahaga sum býarvakstrarøki stendur í Kommunuætlanini:

"*Atkomuviðurskiftini í Húsahaga eru sera góð, tá til ber at koma inn á økið frá Oyggjarvegnum. Økið liggur lutfalsliga avbyrgt og langt burturi frá øðrum. Tí eru trivnaðarviðurskiftini ikki so góð her. Mett verður, at neyðuga íløgan í kloakk, um økið skal nýtast sum bústaðarøki, er órímiliga dýr. Tí kann hugsast, um økið her kann nýtast til vinnuøki, tá tað ikki krevur eins nógv av kloakering.*"

Nógv av tí, sum stendur um Húsahaga í Kommunuætlanini, er somuleiðis galdandi fyri matr. nr. 1175i – økið er avbyrgt og langt burturi frá øðrum, trivnaðarviðurskiftini eru ikki so góð og egnar økið seg betur til vinnuøki enn sum bústaðarøki.

Matr. nr. 1175i er vestasti partur av einum uml. 40.000 $m^2$ stórum vinnuøki við Oyggjarvegin, har m.a. Brandstøðin heldur til. Talan er um eitt B4 vinnuøki, ið loyvir vinnuvirkjum í umhvørvisflokki 2-4, og eru hesi tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Frástøðan til bústaðir er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar.

Ein tílík broyting, sum søkt verður um, ávirkar ikki einans sjálvan matrikulin, men ávirkar eisini vinnuøkið, ið liggur eystanfyri, av tí at ein ávís frástøða verður kravd millum bústaðir, og vinnuvirki í umhvørvisflokki 2-4. Um bústaðir verða loyvdir á matr. nr. 1175i ávirkar hetta soleiðis ein part av vinnuøkinum við Oyggjarvegin, og kann hesin parturin ikki nýtast til tað, sum byggisamtyktin annars loyvir, sí grøna skraveraða økið á skjali *Byggisamtykt.*

Hóast tað er eftirspurningur eftir bústøðum í kommununi, so er somuleiðis eftirspurningurin eftir vinnuøkjum stórur. Tí verður tað ikki mett vera rætt at broyta eitt stykki í einum øki, ið frammanundan er planlagt til vinnu, til bústaðarøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í B4 øki, og eru ásetingarnar fyri hetta m.a.:
- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðisparti skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Um møguleiki skal vera at byggja íbúðir á økinum, má økið broytast til A2 øki ella A3 øki.

Ásetingarnar fyri A2 øki eru m.a.:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,8.
- Hús kunnu einans verða bygd við í mesta lagi 5 hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m mált til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

Ásetingarnar fyri A3 øki eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virki, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Byggistig 0,3.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús ella raðhús.
- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Í B4 økjum verða vinnuvirki í umhvørvisflokkunum 2 til 4 loyvd. Í vegleiðingini til flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu, stendur soleiðis um flokk 4:
*"Umfatar virki, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kann staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga*

*matvøruvirkir og t.d. minni virkir sum bilverkstaðir við sproytukabinu. Frástøðan til bústaðir, er fyri henda flokk uml. 50-100 metrar."*

Umhvørvisdálkingin, ið stendst av vindmyllulundunum í økinum – verandi og ætlaðu – ávirka ikki matr. nr. 1175i.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur verið til hoyring hjá teknisku deild og upplýsa tey, at kommunan er í samráð við Landsverk um yvirtøku av Oyggjarvegnum, niðan til Hotel Føroyar. Annars hava tey ongar viðmerkingar til umsóknina.

**Skjøl**
- *Brot úr Kommunuætlanini 2020,* journal nr. 20/04650-5.
- *Byggisamtykt,* journal nr. 20/04650-6.
- *Økið,* journal nr. 20/04650-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn, grundað á:
- Økið er ein natúrligur partur av vinnuøkinum við Oyggjarvegin.
- Økið liggur avbyrgt og uttanfyri planlagt bústaðarøki.
- Broytingin er ikki í tráð við vegleiðingina um umhvørvisflokking í Tórshavnar kommunu, og hevði ein tílík broyting havt ávirkan á møguligu nýtsluna av grannaognum.
- Tørvur er á vinnuøkjum í kommununi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Marin Katrina Frýdal og Turið Horn taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein mæla til at ganga umsøkjaranum á møti um at broyta byggisamtyktina.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at ganga umsøkjaranum á møti um at broyta byggisamtyktina við treytum sum umsitingin setur og at kloakkviðurskiftini kunnu loysast uttan kostnað fyri kommununa.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk Bjørg Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Á fundi hin 25. februar 2021 samtykti býráðið at broyta almennu byggisamtyktina fyri matr. nr. 1175i, Tórshavn, soleiðis at íbúðarbygging kann loyvast á stykkinum.

Býarskipanarliga verður mett, at um økið skal nýtast til bústaðabygging, so hóskar tað seg frægast at liggja sum A2 øki, sum er øki ætlað høgari bústaðabygging. Økið liggur á somu hæddarkurvu sum økið við høgari íbúðarbygging á Heimasta hornið, og er tað í tráð við øki aðrastaðni í býnum, har høg bygging verður loyvd framvið brøttum lendi. Tó er ynskið ikki, at byggingin skal koma upp um lendið norðanfyri, og tískil eigur at verða hugt eftir hæddarkurvum í økinum, tá mest loyvda hædd verður ásett – hetta verður væntandi 2-4 hæddir.

Sum víst á í málslýsingini omanfyri, so er økið í dag partur av einum B4 vinnuøki. Bilasølan og brandstøðin, ið liggja beint eystan fyri matr. nr. 1175i, verða framvegis B4 vinnuøki, og matr. nr. 1175i verður broyttur til A2 øki, soleiðis at íbúðarbygging kann loyvast. Í B4 vinnuøkjum verða vinnuvirki í flokki 2-4 loyvd. Hetta eru vinnuvirki, ið hava ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og tí verður í vegleiðingini um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu mælt til, at tílík virki hava eina frástøðu til bústaðir á 20-100 m.

Á matr. nr. 1175c, sum er nærmasti granni hjá matr. nr. 1175i, er í dag ein bilasøla. Hóast ásetingarnar fyri B4 øki loyva vinnuvirkjum í umhvørvisflokki 2-4, so er virksemi á matr. nr. 1175c í dag, ikki í nøkrum umhvørvisflokki, av tí at søla av bilum ikki verður mett at dálka umhvørvið. Tó, so stendst ein ávís til/frákoyring frá bilasøluni, ið kann verða órógvandi fyri bústaðarøkið, og vanliga verða hesi ikki staðsett lið um lið.

Av tí at matr. nr. 1175c liggur í mark við matr. nr. 1175i, verður mælt til, at virksemið, og framtíðarvirksemið á matriklinum, ikki verður hægri enn umhvørvisflokkur 2. Hetta soleiðis at virksemið á matr. nr. 1175c órógvar íbúgvarnar í íbúðarbygninginum sum minst.

Býarskipanarliga amboðið í tílíkum málum, har viðurskifti, so sum loyvt virksemi, hæddir, skipan av økinum og umhvørvisflokking, skulu ásetast fyri eitt avmarkað øki, eru serstakar byggisamtyktir. Hetta er ein demokratisk mannagongd við t.d. almennari hoyring og góðkenning frá landinum, umframt at serstakar byggisamtyktir liggja alment atkomuligar.

Í hesum málinum hevur ynski tó verið frammi um at seta ásetingarnar um hædd og umhvørvisflokking í skeytið. Tað er møguligt, og leggur somu bindingar á økið og byggingina, men er ikki ein nútímans máti at skipa býin uppá. Við at brúka ásetingar í skeytum ístaðin fyri í serstakari byggisamtykt, verður tað torført hjá kommununi at býarskipa og umsita, umframt at gjøgnumskygni hjá borgarunum verður skert.

Um ásetingar viðvíkjandi mest loyvdu hædd og umhvørvisflokking verða settar í skeytið, verður mælt til, at avtala um hetta verður gjørd við eigararnar av matr. nr. 1175i og 1175c, áðrenn uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini verður send Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til endaliga góðkenning.

Í avtaluni eiga ásetingar um mest loyvdu hædd, væntandi 2-4 hæddir, at verða ásettar fyri matr. nr. 1175i, umframt at treyt um, at virksemið á matr. nr. 1175c ikki skal vera í hægri umhvørvisflokki enn 2, smb. vegleiðingini um flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at skipa økið við serstakari byggisamtykt.

Um avtala skal gerast um at seta ásetingarnar í skeytið, mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til:
- At áseting um mest loyvdu hædd verður sett í skeytið fyri matr. nr. 1175i. Hendan hæddin verður ásett við støði í lendinum norðanfyri og verður væntandi 2-4 hæddir (9-12 m).
- At áseting um, at vinnuvirkið á matr. nr. 1175c ikki er í hægri umhvørvisflokki enn 2, smb. vegleiðing um umhvørvisflokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, samtykti at seta ásetingarnar í skeytið.

Ein minniluti, Ruth Vang og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum um at gera serstaka byggisamtykt.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í byggi- og býrskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Annika Olsen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Høgni Joensen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunnvør Balle.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi hin 27. mai 2021 varð samtykt, at seta ásetingar viðv. hæddum á íbúðarbyggingini við Oyggjarvegin í skeytið, men annars broyta almennu byggisamtyktina fyri økið soleiðis, at íbúðir kundu byggjast har.

Broytingin av almennu byggisamtyktini lá til almenna hoyring frá 19. apríl 2021 til 31. mai 2021, og varð síðani send Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til endaliga góðkenning. 13. oktober 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið sent Tórshavnar kommunu skriv, har boðað verður frá, at ráðið ikki ætlar at góðkenna uppskotið til broyting í almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1175i við Oyggjarvegin, sí skjal *Scanned from a Xerox Multifunction Printer (020).pdf.* Niðurstøðan í skrivinum er, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið metir, at slíkar býarskipanarligar reguleringar, sum ætlanin var at seta í skeytið, skulu skipast í byggisamtykt innan fyri karmarnar í býarskipanarlógini og ikki privatrættarliga í servituttum við kommunalum átalurætti.

Tískil er neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1175i, ið ásetir hæddarreguleringarnar av íbúðarbyggingini. Harumframt verður mælt til, at áseting um mest loyvdu umhvørvisflokking á matr. nr. 1175c, verður í serstøku byggisamtyktini. Hetta tí at matr. nr. 1175c liggur í mark við matr. nr. 1175i og mælt verður til, at virksemið á matr. nr. 1175c ikki verður hægri enn í umhvørvisflokki 2, soleiðis at íbúgvarnir í íbúðarbygninginum ikki vera órógvaðir órímiliga nógv.

Umsøkjari hevur sent inn uppskot, ið vísir hvussu byggingin á økinum ætlandi verður, sí skjal *Oyggjarvegur 2021 til TK.pdf*. Uppskotið vísir tríggjar bygningar á økinum, ið allir eru í 4 hæddum. Í viðgerðini av málinum hevur dentur verði lagdur á, at byggingin í vestaru helvtini av grundstykkinum skal vera í mesta lagi í 3 hæddum, og byggingin í eystara partinum kann vera í 4 hæddum – hetta soleiðis at byggingin fylgir lendinum. Hetta er somuleiðis tað, ið stendur í deklaratiónini, ið eftir ætlan skuldi tinglýsast á ognina. Umsitingin hevur gjørt visualiseringar, ið vísa hvussu bygningurin tekur seg út úr ymiskum sjónarhornum, um hann er í 4 hæddum ella um hann er í 3 hæddum á vestara partinum, sí skjal *Visualiseringar.* Umsitingin mælir til, at hildið verður fast í hesum hæddarásetinum.

Uppskotið vísir ikki eitt nøktandi fríøki, og má eitt tílíkt vísast, áðrenn uppskotið til serstaka byggisamtykt verður lagt til almenna hoyring.

Viðvíkjandi innkoyringini til økið hevur tekniska deild tað viðmerking, at um mest loyvda ferðin á vegastrekkinum framvið, sum í næstum verður yvirtikið av kommununi, verður sett niður í 50 km/t, so er ein íbinding, sum víst í uppskotinum, ráðilig.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt smb. Skjalinum *Serstøk byggisamtykt – tekstur 25-10-21*, treytað av at nøktandi fríøki fæst, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Jákup Dam, samtykti at broyta almennu byggisamtyktina til økisáseting A2, uttan at áseta treytir í skeytið og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Ætlanirnar um at skipa byggingina á økinum í serstakari byggisamtykt ella í skeytinum eru sleptar, og er tað samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini, at byggingin í økinum skal fylgja ásetingunum fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
Harumframt er umsókn send Búnaðarstovuni um at keypa 299 m$^2$ av matr. nr. 1231, Tórshavn, at leggja afturat matr. nr. 1175i, sí skjal *Búnaðarstovan Oyggjarvegur 299m2.pdf*. Hetta í sambandi við at íbúðarverkætlanin er broytt eitt sindur í mun til fyrstu ætlan. Umsóknin er send Búnaðarstovuni, ið hevur sent Tórshavnar kommunu hana til ummælis. Í umsóknini til Búnaðarstovuna verður skrivað, at umsøkjari hevur samskift við bóndan, ið er positivur fyri ætlanini.

Búnaðarstovan hevur áður víst á, at Búnaðarstovan selur landsjørð sum meginreglu til kommunur í sambandi við sethúsaútstykkingar, ídnaðarøkir v.m. Tá talan er um ískoytisstykkir og smærri matrikulerar rættingar verður selt beinleiðis til keyparan.

Matr. nr. 1231, Tórshavn liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og matr. nr. 1175i, Tórshavn, skal eftir ætlan leggjast sum A2 øki. Í sambandi við at umsøkjari ynskir at keypa part av matr. nr. 1231 at leggja afturat matr. nr. 1175i er neyðugt, at hesin parturin verður broyttur til A2 øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri 299 m$^2$ av matr. nr. 1231, Tórshavn, til A2 øki sambært umsóknini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

# 326/21 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 147/21 | 21/03382-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 27.09.2021 | 7/21 | 21/03382-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 235/21 | 21/03382-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.10.2021 | 192/21 | 21/03382-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 260/21 | 21/03382-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 257/21 | 21/03382-1 |
| 7 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 326/21 | 21/03382-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt, at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli, at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti og serstakan bygdadám.

Í hesum málinum verður serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Velbastaður er fevndur av byggisamtyktini hjá Kirkjubøar kommunu, og varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína serstaka byggisamtykt, í trá við ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta merkir, at serstaka byggisamtyktin fyri Kirkubø/Velbastað verður býtt í tvey, soleiðis at bygdirnar fáa hvør sína serstaka byggisamtykt.

Mett verður ikki, at serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava eins nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Velbastað, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C:1A: Vinnuendamál
D: Havnaøki

$D^1$: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss
H: Frílendi
$H^1$: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, sum smb. uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

SA: Bústaðarøki
SB1: Havnaøki
SB2: Vinnuøki
SD1: Frílendi
SD2: Almennir stovnar og mentan
SE: Neyst
SF: Frítíðarhús

Tá kemur til bókstavir og tøl, verða somu tekin brúkt fyri økini í bygdunum sum í høvuðsstaðnum, men við tí muni, at “S” er sett frammanfyri bókstavirnar og tølini, t.d. “S”B1, fyri at vísa til at talan er um øki í eini serstakari byggisamtykt, og ikki í høvuðsstaðnum.

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.

- B: Sethúsaøki er broytt til SA: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A Vinnuendamál eru broytt til SB2: Vinnuøki
- Tey bæði havnaøkini D: Havnaøki og $D^1$: Ferjuhavn, eru broytt til SB1: Havnaøki
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til SD2: Almennir stovnar og mentan
- G: Neyst og bátapláss er broytt til SE: Neyst
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og $H^1$: Fríðað øki eru broytt til SD1: Frílendi
- Tey bæði landbúnaðarøkini J: Bóndahús og K: Landbúnaður eru broytt til 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri:

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Á Velbastað verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum, tvíhúsum, raðhúsum og íbúðum. Bygdin hevur eina hóskandi støðd og nærleika til høvuðstaðin, og mett verður, at dámurin í bygdini rúmar hesum typologium.

Í sethúsaøkjum í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og á Velbastað verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta grundað á lendisviðurskifti, og verandi víddir á grundstykkjum í bygdini.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi vera tær somu sum fyri sethúsaøki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnu-/Havnaøki**
Í summum bygdum eru vinnu- og havnaøkini tvunnin saman, meðan tað í summum bygdum eru ymiskar ásetingar – á Velbastað eru tað áðrenn endurskoðanina tvey ymisk vinnuøki og tvey ymisk havnaøki.

Mett verður, at tað er greiðast at hava eitt øki til vinnu og eitt øki til havnaendamál í serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar. Soleiðis verða tey atskild, uttan at tað gerst ov ítøkiligt, júst hvat virksemi skal vera í økinum.

**Almenn øki**
Í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað er áðrenn endurskoðanina 4 ymisk almenn øki – Almenn frítíðarøki, øki til almennar stovnar, frílendi og friðað øki.

Mett verður, at í bygdunum eiga tvey ymisk almenn øki at vera – eitt til grøn fríøki, har ikki er loyvt at byggja, og eitt til almennar stovnar, ítrótt og mentan. Ikki er neyðugt við serskildum øki til friðað øki. Hesi eru friðað smb. løgtingslógum, t.d. nr. 48 um náttúrufriðing og nr. 19 um fornminni og bygningar.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó, so skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í § 26, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at:
- *Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygd sambært serstakum byggisamtyktum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um fíggjarligan stuðul til ábøtur á spæliplássið á Velbastað, matr. nr. 50a og 50ak,* journal nr. 16/02938.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *KirkjubøVelbastað – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 21/03382-2.
- *Kort – áðrenn endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Kort – eftir endurskoðan,* journal nr. 21/03382-3.
- *Serstøk byggisamtykt – Tekstur,* journal nr. 21/03382-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur* og *Kort – eftir endurskoðan,* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 27. september 2021:**

**Ein meiriluti:** Dánjal Pauli í Búðini, Eyðbjørn Gaard og Bryndis Hjartardsdóttir tekur ikki undir við at J og K umráði verða broytt til 4. grundumráði vegna væntandi kunning, men annars tekur nevndin undir við hinum punktunum.

**Ein minniluti:** Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, men at J blívur standandi.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at beina málið aftur i byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Høvuðsendamálið við at endurskoða serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar, er at gera tær so eins sum gjørligt og at endurskoða tær í síni heild, soleiðis at tær eru í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Ein liður í at gera tær so eins sum gjørligt, er at leggja landbúnaðarøkini undir 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Sambært almennu byggisamtyktini § 26, stk. 5, liggja allar bygdirnar í kommununi í 4. grundumráði í Tórshavnar kommunu, og hava tær serstakar byggisamtyktir, ið stýra byggingini. Um serstaka byggisamtyktin fyri Velbastað skal vera í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, er tað tískil eisini rættast, at taka landbúnaðarøkið úr serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað.

Ásetingarnar fyri K: Landbúnaðarøki í verandi serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru hesar:

13. gr., 1. Øki K er tað, sum eftir er av kommununi, tá frammanundan nevndu øki eru tikin frá, og verður tað nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.

2. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum við teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald.

3. Hús og teknisk virki skulu vera soleiðis til útsjóndar og setast soleiðis í lendinum, at tey lýta landslagið minst gjørligt.

4. Útstykking má ikki fara fram.

Ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru hesar:

§26, 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

a) Tó er loyvt at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
b) Á jarðarstykkjum oman fyri 5000 $m^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 60 $m^2$ í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 $m^2$ gólvvídd.
c) Á jarðarstykkjum undir 5000 $m^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja tilsamans 30 $m^2$ gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
d) Eisini er loyvt at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
e) Harafturat kann onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, staðsetast í 4. Grundumráði.
f) Øll bygging í 4. Grundumráði sambært §26, stk. 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

3. Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

4. Í sambandi við bygging í 4. Grundumráði treytar kommuna sær rætt at seta krøv til skap og staðseting.

5. Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. Grundumráði, einans verða bygt sambært serstøkum byggisamtyktum.

Sum sæst, so eru ásetingarnar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eitt sindur breiðari, enn tær fyri K: Landbúnaðarøki í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað, men annars loyva tær tí sama virkseminum, sum loyvt verður á landbúnaðarøki á Velbastað. Tí verður tað ikki mett at hava tað stóru ávirkanina á nýtsluna av økinum, um landbúnaðarøkið á Velbastað verður lagt undir 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Eftir at málið varð samtykt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini, hava ásetingarnar fyri J: Bóndahús verið umrøddar – m.a. í staðbundnu nevndini fyri Kirkjubø/Velbastað.

Ásetingarnar fyri J: Bóndahús í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað eru hesar:

11. gr. 1. Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.

2. Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.

3. Útstykkking má ikki fara fram.

Tað varð m.a. víst á, at ásetingarnar fyri J: Bóndahús geva festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. Grundurmáði geva. Tað hevur í eina tíð verið umrøtt, hvussu farast skal fram, tá nýggir festarar koma á festi, og fyrrverandi fara frá. Fráfarandi festararnir ynskja tíðum at yvirtaka sethúsini, ið teir hava bygt til festið, men teir fáa ikki loyvi til at matrikulera ognina frá festinum, av tí at tað ikki liggur í sethúsaøki í byggisamtyktini. Í mun til býarplanlegging, so metir man ikki, at tað er skynsamt at broyta økini kring sethús við festi til sethúsaøki, m.a. av tí at man við tíðini fer at fáa smáar býlingar á øki, sum ikki er ætlað býarmenningarøki. Tórshavnar kommuna hevur umrøtt hendan trupulleikan við Búnaðarstovuna, men inntil ein loysn er funnin, verður mett ráðiligt, at ásetingarnar fyri J: Bóndahús verða verandi í serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað. Harafturat verður mælt til, at ásetingarnar fyri bóndahús verða settar í allar tær serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – tekstur* og *Kort – eftir endurskoðan*, við teirri broyting, at ásetingarnar fyri bóndahús verða varðveittar, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað hevur ligið til hoyringar frá 1. nov. 2021 til 13. des. 2021 og í tí sambandi eru 3 mótmæli innkomin. Niðanfyri er ein samandráttur av hesum.

1. Mótmæli frá festarum á Velbastað, skjal *Mótmæli av serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað v. Undirskriftum*, verður m.a. hetta ført fram:
   - Í uppskotinum verður økið K:Landbúnaður broytt til 4. Grundumráði. Hetta vilja festararnir ikki finna seg í, tá teir meina, at hetta setur festaran í ein ótrygga støðu. Um hugt verður eftir orðingini fyri tey bæði økini, so síggja tey samanumtikið soleiðis út:
     K:Landbúnaðarøki: *"Økið verður nýtt til landbúnað, grótbrot, fiskaalistøðir o.a.. Loyvt er bert at byggja hús, ið eru neyðug til tess at tryggja fullgóðan rakstur av virkjum og teim endamálum, sum nevnd eru í stk. 1. Tó er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið neyðug eru til ravmagns- og vatnveitingar, til burturveiting av skarnvatni og til telefon- og telegrafsamband og í sambandi við vegahald."*
     4. Grundumráði: *"4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt."*
     Serliga er tað orðið "tílíkt", ið ørkymlar festararnar, tí hetta kann boyggjast og

vendast fleiri vegir, alt eftir hvørji áhugamálini eru.
   - Í uppskotinum verður økið H:Fílendi broytt til SD1: Alment frílendi. Orðingarnar fyri økini eru soljóðandi:
     H:Frílendi: *"Frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í."*
     SD1: Alment frílendi: "*Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Útstykking má ikki fara fram."*
   - Her verður bøurin hjá bøndrunum á Velbastað lagdur til almenning, t.v.s. at bóndin missir ræðisrættin á bønum, og má hetta vera at rokna sum ognartøka.
   - Tá Kirkjubøar kommuna bleiv løgd saman við Tórshavnar kommunu, varð orðað um landbúnað at Kirkjubøur og Velbastaður skuldu verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Við at broyta byggisamtyktina, virðir kommunan ikki tær ásetingar, sum vóru settar, tá kommunurnar løgdu saman.
   - Harumframt verður ført fram, at korini sum festari í Tórshavnar kommunu verða munandi verri av hesi byggisamtyktini, og hevði tað verið uppá sítt pláss, at kommunan kom við eini frágreiðing um, hvørja støðu kommunan hevur til landbúnaðin á Velbastað sum heild.

Niðanfyri eru viðmerkingarnar hjá umsitingini hjá Tórshavnar kommunu til mótmælið frá festarunum:
   - Høvuðsendamálið við at endurskoða serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar er at gera tær so eins sum gjørligt og at endurskoða tær í síni heild, soleiðis at tær eru í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og soleiðis at borgarar í kommunu fáa líka treytir at byggja og virka sambært. Ein liður í at gera tær so eins sum gjørligt er, at leggja landbúnaðarøkini undir 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
     Rætt er, at ásetingarnar fyri 4. grundumráði eru eitt sindur meira víttfevnandi og lata upp fyri fleiri møguleikum, enn ásetingarnar fyri K: Landbúnaðarøki loyva. Hetta verður mett ráðiligt og skynsamt, av tí at talan kann vera um virksemi, ið ikki hóska seg at liggja í bygdum øki, men sum tó ikki er banleiðis tengt at landbúnaðarvirksemi. Við ásetingunum fyri 4. Grundumráði er gjørligt at geva tílíkum virksemi pláss, og verður hetta mett at vera ein styrki fyri kommununa. Um annað virksemið, enn landbúnaðarvirksemi skal kunna loyvast í 4. Grundumráði er neyðugt við eini serstakari byggisamtykt fyri júst tað økið og virksemið, og er tað við til at tryggja, at

virksemið er væl gjøgnumhugsað og viðgjørt, umframt at almenningur og viðkomandi partar annars, verða hoyrdir. Harumframt skal øll bygging í 4. Grundumráði (og K:landbúnaðarøki), tað verði seg bæði bygging til landbúnaðarvirksemi og annað virksemi, góðkennast av Yvirfriðingarnevndini.

- Heiti á økinum SD1 "Alment frílendi" verður broytt til "Frílendi", soleiðis at eingin ivi er um, at øki, ið eru privat ogn, framvegis eru privat ogn. Annars verður mett, at týdningurin av orðingunum er tann sami, og tískil verður mælt til, at hildið verður fast í orðingunum fyri SD1 øki. Hetta er sama orðing, sum verður nýtt fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
- Mett verður ikki, at endurskoðanin av byggisamtyktini fyri Velbastað ger seg munandi inn á dámin á bygdini sum landbúnaðarbygd. Økini og ásetingarnar eru í ein stóran mun tær somu sum áðrenn, og hildið verður m.a. fast í, at serstakt øki er til bóndahús. Sum nevnt omanfyri, so er tann munurin, at K: landbúnaðarøki verður lagt undir 4. Grundumráði, ið gevur eitt sindur fleiri møguleikar. Hetta verður tó mett at vera ein styrki fyri bygdina og kommununa.

2. Mótmæli og undirskriftir frá borgarum, sí skjal *14122021_Scan.* Niðanfyri er ein samandráttur av mótmælinum.
   - Mótmælið er undirskrivað av íbúgvum á Velbastað, Føroyum annars og nakrar úr útlondunum.
   - Mótmælt verður, at løgfrøðiliga bindandi samanleggingarsáttmálin frá 2005 millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu ikki verður virdur og hildin.
   - Mótmælt verður, at Tórshavnar kommuna ikki virðir Staðbundnu nevndina, ið mælti frá at gera serstaka byggisamtykt fyri Velbastað í mun til ásetingina um 4. Grundumráðið.
   - Mótmælt verður, at 4. Grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu verður partur av byggisamtyktini fyri Velbastað. Serliga er tað orðið "tílíkt" í ásetingini fyri 4. Grundumráði ið verður mótmælt móti, av tí at hetta verður mett at vera ein gummiáseting.

Niðanfyri eru viðmerkingarnar hjá umsitingini hjá Tórshavnar kommunu til mótmælið frá borgarum:

- Umhvørvis- og vinnumálaráðið viðgjørdi tann 21. desember 2020 kæru um, at Tórshavnar kommuna ikki hevur hildið samanleggingarsáttmálan við Kirkjubøar kommunu. Niðurstøðan hjá teimum var, at talan ikki er um eina áseting í samanleggingarsáttmálanum millum kommunurnar, men um eitt mál í einum fylgiskjali til sáttmálan um samanlegging. Kirkjubøar kommuna sendi tann 11. september 2003 Landstýrinum tað endurskoðaðu almennu bygdarskipanina og byggisamtyktina fyri Kirkjubøar kommunu til góðkenningar. Hendan varð endaliga góðkend av Oljufyrisitingini tann 5. mai. 2004. Umhvørvis- og vinnumálaráðið gjørdi ikki meira við tann partin av kæruni.
  Harumframt er at siga, at talan er um ein 16 ára gamlan sáttmála. Broytingar og endurskoðanir av byggisamtyktum er ein natúrligur og neyðugur partur av menningini av eini bygd. Um hetta ikki varð gjørt, varð t.d. heldur ikki møguligt at leggja nýggj bústaðarøki út.
- Orðið "tílíkt" verður regluliga brúkt bæði í serstøkum og almennu byggisamtyktini. Hetta er ein orð ið verður brúkt, av tí at tað í summum førum er neyðugt at gera ítøkiligar metingar út frá einstøku málunum/dømunum.

3. Mótmæli frá Páll Djóna á Steinum, Velbastaður, sí skjøl *Mótmæli ímóti endurskoðan av serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað 13. Desember 2021, Fylgiskjal nr. 1, Fylgiskjal nr. 2 og Fylgiskjal nr. 3.* Í mótmælinum verður m.a. ført fram at:
   - Talan er ikki um at endurskoða eina byggisamtykt, men heldur er talan um at gera tað høgligari fyri Tórshavnar kommunu at skáka sær undan løgfrøðiliga bindandi samanleggingarsáttmálan, ið varð gjørdur millum Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu, tá kommunurnar løgdu saman í 2005.
   - Veruliga orsøkin til at endurskoðanin av byggisamtyktini hevur skund er, at skáka sær undan sáttmálanum millum Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu frá 2005 á ein so snildan, fjaldan og smidligan hátt sum til ber, at kommunan fær fullan ræðisrætt yvir landbúnaðarjørð og at taka landbúnaðarøki úr serstøku byggisamtyktini fyri Velbastað. Tað eru ikki saklig viðurskiftir, ið liggja til grund fyri at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað, men heilt onnur áhugamál, ið Tórshavnar kommuna hevur á dagsskrá.

- Spurnartekin verður sett til, hví Velbastaður er tann fyrsti og einasti, ið er vorðin endurskoðaður.
- Hví er eingin áseting um frástøðu frá áum, vøtnum og náttúruvernd annars við í byggisamtyktini?

Niðanfyri eru viðmerkingarnar hjá umsitingini til mótmælið frá Páll Djóna á Steinum:

- Spurningurin um endurskoðanin av byggisamtyktini fyri Velbastað er eitt brot á samanleggingarsáttmálan millum Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu er umrøddur í smb. við mótmæli 2.
- Uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað er lýst alment sum fyrisett í grein 6 í lóg nr. 13 frá 21. mai 1954. Skjøl, ið vísa byggisamtyktina áðrenn endurskoðan og eftir endurskoðan hava ligið frammi í 6 vikur.
  Endurskoðanin av byggisamtyktini fyri Velbastað er partur av einum arbeiði at endurskoða allar byggisamtyktirnar í kommununi – almennu, byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og tær serstøku byggisamtyktirnar. Tað er eitt mál, ið fyrstu ferð varð samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini tann 13. september 2017 – altso meir enn tvey ár áðrenn umsóknina um returtanga og matstovu/hotel/upplivingardepil í Fossdali.
  Høvuðsendamálið við endurskoðanini av byggisamtyktunum fyri bygdirnar er at gera tær so eins sum gjørligt og í trá við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og at gera rættingar og tillagingar í býarskipanini. Uppskotið um at leggja landbúnað undir 4. Grundumráðið í almennu byggisamtyktini er altso ein liður í at gera byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í trá við almennu byggisamtyktini, av tí at tað í almennu byggisamtyktini stendur, at allar bygdirnar í kommununi liggja í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.
- Byggisamtyktirnar fyri bygdirnar verða allar endurskoðaðar so líðandi, og nevnast kann, at uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest varð samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini hin 24. november 2021.
- Ásetingar um náttúrufriðingar eru tryggjaðar samb. løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970. Í náttúrufriðingarlógini eru m.a. ásetingar um frástøður frá viðalundum, áum og vøtnum, og skulu hesar altíð fylgjast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í uppskotinum um broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað við teirri broyting, at heiti á SD1 økinum verður broytt frá "Alment frílendi" til "Frílendi", og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Annfinn Brekkstein legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

«Mælt verður til at varðveita ásetingarnar fyri H:frílendi, sum standa í galdandi byggisamtykt fyri Velbastað, og einans broyta forbókstavirnir til SD1»

Einmælt samtykt at taka undir við broytingini av byggisamtyktini við omanfyristandandi broytingaruppskoti av ásetingini fyri frílendi.

# 327/21 Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 327/21 | 21/04476-1 |

**Málslýsing**
Uppskot frá umsitingini til fundardagar 2022 kl. 16:00 í býráðssalinum.

27. januar
24. februar
24. mars
28. apríl
25. mai
22. juni
01. september
29. september
27. oktober
24. november
15. desember

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum til fundardagar fyri 2022.

# 328/21 Málslýsing - Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 30.11.2021 | 41/21 | 21/04877-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 332/21 | 21/04877-2 |
| 3 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 328/21 | 21/04877-2 |

**Upprunin til málið**
Skriv frá Kommunfelagnum um at seta í gildi felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum.

**Lýsing av málinum**
Seinastu árini eru komnar nógvar klagur frá borgarum um larm frá skipum, í flestu av størru havnunum. Kommunurnar eftirlýstu í nøkur ár felags markvirðir og reglur á økinum, fyri at kunna avmarka larmin frá skipum uttan at hetta bleiv ein kappingarparametur millum havnirnar.
Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi í desember 2020 "uppskot til kunngerð um óljóð frá skipum við bryggju" til ummælis hjá m.a. Kommunufelagnum, ið sendi inn hoyringsskriv saman við skitsu til eina alternativa loysn í januar 2021. Eftir fund millum Kommunufelagið og UVMR avgjørdi UVMR í mai 2021 at geva kommununum ein møguleika og freist fram til 1. november 2021 til at finna eina felags kommunala loysn á málinum.
Havnanetverkið undir Kommunufelagnum hevur síðani arbeitt við málinum, m.a. eru ljóðmátingar gjørdar í ymsum havnum, av ymsum skipum umframt inni í bústøðum, til tess at finna fram til hóskandi markvirðir. Umhvørvisstovan hevur havt uppskotið til viðmerkingar og semja er um markvirðini.
Uppskotið til eina felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum og hartil hoyrandi markvirðir er nú liðugt og klárt at samtykkja hjá hvørji einstakari kommunu.
Tá ið reglugerðin er sett í gildi í kommununum, sum reka vinnuligu havnirnar, verða felags reglur og markvirðir galdandi í øllum havnum. Hetta merkir m.a. at ljóðmátingar av skipum, sum verða gjørdar í eini havn, og boð, ið havnirnar geva skipum í hesum sambandi, verða galdandi fyri allar havnir.
Tað er ein fortreyt fyri at skipanin kemur at virka sum ætlað, at allar kommunur, ið eiga og reka vinnuligu havnirnar, samtykkja og seta í gildi reglugerðina, annars hevur UVMR boðað frá, at upprunaliga kunngerðin, ið varð send til hoyringar í desember 2020, verður sett í gildi í staðin, og verður kunngerðin tá galdandi fyri allar havnir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 21/04877-3 : Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum (v1.0, nov. 2021)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>16. desember 2021 | Blað nr.: 1284 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| Fíggjarliggar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við uppskoti til Felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum, j.nr. 21/04877-3, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 30. november 2021:**
Ein meiriluti: Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Elsa Berg atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Atvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 3 blonkum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam, Annika Olsen, Birgir Niesen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

# 329/21 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |
| 9 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2020 | 48/20 | 17/03154-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.02.2021 | 11/21 | 17/03154-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2021 | 47/21 | 17/03154-1 |
| 12 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 329/21 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum ‘Grøna leiðin’ hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.
4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur

6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:
1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og CO2-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:
- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og CO2-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur  høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$- sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í seinasta ískoyti og framløgu varð nevnt, at fortreytin fyri at fáa eina grønari kommunu við 50% lægri $CO_2$-útláti í 2025 er, at kommunan játtar 13,5 mió. kr. um árið, umframt tað sum er játtað á rakstri og íløgu, íalt 15 mió. kr. hvørt ár í 6 ár 2020-2025, ella í alt 90 mió. kr.

Í 2020 vórðu játtaðar 5,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 3,5 mió. kr. vóru beinleiðis til orkupolitikkin.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2021 lækkar upphæddin til 4,0 mió. kr., harav 1,5 mió. kr. fara til viðlíkahald og orkuátøk í bygningum, tað vil siga, at 2,5 mió. kr. fara beinleiðis til orkupolitikkin.

Uppskotið til almenna orkupolitikkin (tekstur), ið byggir á upprunaligu ætlanina, at minka $CO_2$-útlátið 50%, er næstan klárt. Tó er áramálið nú bert 4 ár fram til 2025, og tí má árliga upphæddin til íløgur verða samsvarandi størri, uml. 22 mió. kr. um árið í 4 ár 2022-2025, um málið skal røkkast.

Ætlanin er at seta í verk gerð av faldara, við uppseting, tekningum og prenti og at fíggja hetta av rakstri, kontu 6610.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at arbeiðið at gera faldara, ið byggir á upprunaligu ætlanina í Orkupolitikkinum og Grønu leiðini, verður sett í verk og fíggjað av rakstri, konto 6610.

Eisini verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% í 2025 skal leingjast, vísandi til at neyðugur peningur ikki er settur av í 2020 og 2021.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leingja málið at lækka $CO_2$-útlátið við 50% til 2027.

**Ískoyti:**
Elsa Berg, nevndarlimur, hevur biðið um at fáa málið lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina aftur. Hon vísir á, at á fyrsta fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini fekk nevndin eina frágreiðing frá umsitingini um umhvørvis- og orku politikkin hjá Tórshavnar kommunu. Har varð staðfest, at vit fara beint øvugtan veg í mun til okkara útlátsmál, í og við at útlátið enn er í øking og at neyðugt er við sterkari átøkum og meira fígging.

Elsa Berg ynskir at nevndin viðger støðuna, og hvat skal til av átøkum og pengum, fyri at vit røkka málinum.

Hetta varð lýst, tá málið bleiv samtykt, men má dagførast.

Kunnað verður um málið og framløga.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. februar 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Sambært orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommuna skal $CO_2$ útlátið hjá kommununi minka við 50% í 2027 í mun til 2016, og hetta skal gerast við at leggja dent á 3 høvuðsmál:

1. GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027
2. LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027
3. EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERÐA ELRIKNIR Í 2027

Á leið 90 mió. kr. skulu fram til 2027 brúkast á orkuøkinum, um hesi mál skulu røkkast.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til eina ætlan fyri 2022, fyri hvørt av teimum trimum orkumálum, sum skal tryggja, at ferð kemur á grøna orkuskiftið í kommunala geiranum. Harumframt verður uppskot lagt fram um, hvussu umsitingin kann skipa seg í arbeiðsbólk og arbeiða víðari við mannagongdum og ársfrágreiðingum fram til 2027.

Útgangsstøði er tikið í eini samlaðari játtan á 8. mió. kr. til orkuátøk í 2022. Tað letur seg ikki gera at røkka orkumálunum við umrøddu játtanini, men kann hon vera fyrsta stig til at raðfesta orkuøkið hægri komandi árini.

*<u>ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING: ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027</u>*

Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum av virkseminum hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 17 oljufýringar hjá TK skiftast til grøna orku á hvørjum ári frá 2021. Í 2021 vóru 8 oljufýringar skiftar út við fjarhita ella hitapumpu, og kommunan setir ikki nýggjar oljufýringar upp.

Fjarhitaskipanin hjá kommununi er undir útbygging. Hon kann nýta orku frá alskyns orkukeldum, og kann hon samvirka við aðrar partar av orkuinfrakervinum t.d. taka ímóti avlopsorku frá vindmegi og aðrari elframleiðslu, sum verður alsamt meiri týðandi í framtíðar grøna orkuinfrakervinum. Fjarhitanetið verður nýtt til at binda orkuframleiðslu og nýtsluna saman í kommununi og at gagnnýta orku, sum annars fer til spillis. Tí mælir umsitingin til at raðfesta íbinding í fjarhitanetið í 2022.

Eisini eru størri verkætlanir, ið umsitingin metir eiga at verða raðfestar komandi árini.

**Umsitingin ætlar at brúka 3,9 mió. kr. til at knýta 7 almennar bygningar í fjarhitaskipanina umframt 1,5 mió. til eitt orkuátak sambært fylgiskjali 1.**

*<u>ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS: ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027</u>*
Gøtuljós umboða áleið 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá kommununi. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar hesin parturin av el-nýtsluni á leið ein triðing, umframt at útreiðslan av hesari íløguni av tí sama verður spard aftur eftir fáum árum.

Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED hvørt ár. Tórshavnar kommuna eigur uml. 9.000 gøtuljós, av hesum eru áleið 2.600 skift til LED.

Higartil eru 710 gøtuljós skift í 2021.

**Umsitingin ætlar at brúka 1,6 mió. kr. til at skifta 570 gøtuljós til LED í 2022 sambært fylgiskjali 1, umframt at skifta gøtuljós fyri ta íløguupphædd frá 2021, sum ikki verður brúkt í ár, væntandi á leið kr. 500.000,-.**

*ORKUMÁL 3 - EL-AKFØR: ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027*
Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Sambært orkupolitikkinum skulu á leið 15 bilar skiftast til el hvørt ár frá 2021.

Í 2020 vóru 9 elbilar í kommununi. Í dag eru 13. Harafturat eru 2 elbilar skiftir út við nýggjar elbilar. Uml. 22 bilar skulu eftir ætlan skiftast í 2022. Aloftast stendst ein eykaútreiðsla av at skifta til el-bil heldur enn til ein bil riknan við steinolju, m.a. til løðistøðir o.a.

**Umsitingin ætlar at brúka 1 mió. til eykaútreiðslur av at skifta 10 akfør til el í 2022 sambært fylgiskjal 1.**

*Ætlan 2022-2027*
At gera mannagongdir, útlátsrokningar- og framskrivingar krevur nógva tíð og orku. Um kommunan verður betri til at skapa virði burturúr dáta um orkunýtslu- og framleiðslu kunnu vit seta í verk loysnir, sum tryggja at arbeiðið ber á mál.

Tórshavnar kommuna arbeiðir við at skráseta orkudáta í Energykey, sum er ein skipan til at samla dáta og hava eftirlit við orkuøkinum í kommununi. Tá skipanin er klár, kann hon m.a. brúkast til at gera støðulýsingar og ætlanir fyri, hvussu kommunan fær sum mest burturúr sínum orkuíløgum, og geva innlit í, hvar tað er mest átroðkandi at minka um $CO_2$-útlátið og orkunýtsluna.

**Umsitingin ætlar at raðfesta at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing umframt eina ætlan fyri 2023-2027.**

Áðrenn Energykey verður klárt, verður neyðugt at dagføra útlátstølini fyri 2019, 2020 og 2021. Harumframt krevst eyka arbeiði at fáa øll dátu skrásett í Energykey, soleiðis at skipanin fevnir um alt orkuøkið og ikki, sum støðan er nú, bert bygningar. Umsitingin hevur í hesum sambandi umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at eitt fólk verður sett í eitt verkætlanarsett starv til útiloðkandi at arbeiða við at dagføra útlátstølini og skráseta í Energykey.

Fyri at koma á mál við orkupolitikkinum er eisini neyðugt at menna samstarvið millum deildirnar. Fyrst og fremst eru tað bygningsdeildin, verkstaðið, vatn- og gøtuljósdeildin og umhvørvisdeildin sum eru beinleiðis knýtt at teimum 3 orkumálunum umvegis dagliga virksemið. Neyðugt verður at møtast regluliga fyri at fylgja støðuni, umframt at gera ætlan fyri 2023-2027.

Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini leggja hervið uppskot fram um ætlanina fyri tey trý orkumálini í 2022:
- 3,9 mió. til at knýta 7 bygningar í fjarhitaskipanina
- 1,5 mió. til orkuátak
- 1,6. mió. til at skifta 570 gøtuljós til LED
- 1 mió. til at skifta 10 akfør til el

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at umsitingin arbeiðir víðari við omanfyri nevndu ætlan m.a. at fáa Energykey klárt í fyrru helvt av 2022, so skipanin kann brúkast til at gera eina støðulýsing og ætlan fyri 2023-2027.

Mælt verður til at nýta kr. 200.000 av konto nr. 6610 hjá umhvørvisdeildini frá játtanini fyri 2021 til verkætlanarsett starv í uml. 4 mánaðir til at arbeiða við skráseting í Energykey og at dagføra útlátstølini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum umframt at nýta aðrar kr. 100.000 til samskifti. Eisini verður heitt á umsitingina um at arbeiða víðari við orkuskifti í bygningum og koma aftur í nevnd við nýggjum tilmæli.

**Ískoyti:**

Elsa Berg biður um at fáa málið at skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Bjørg Dam um at beina málið í náttúru- og umhvøvisnendina, ið varð samtykt við 9 atkvøðum, 4 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 330/21 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 34/21 | 21/00010-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 68/21 | 21/00010-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 103/21 | 21/00010-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 96/21 | 21/00010-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 130/21 | 21/00010-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 131/21 | 21/00010-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.05.2021 | 157/21 | 21/00010-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 166/21 | 21/00010-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 203/21 | 21/00010-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 230/21 | 21/00010-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 242/21 | 21/00010-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 273/21 | 21/00010-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 280/21 | 21/00010-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 300/21 | 21/00010-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 308/21 | 21/00010-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 334/21 | 21/00010-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | | | 21/00010-1 |
| 19 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 330/21 | 21/00010-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin  fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. mai 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Útsett.

**Ískoyti:**
Framlagt og góðkent fyri fíggjarnevndini umvegis t-post 14. desember 2021.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Framlagt og góðkent.

# 331/21 Kunning um Arctic Mayors' Forum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 92/19 | 18/04082-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 230/19 | 18/04082-5 |
| 3 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 200/19 | 18/04082-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 316/21 | 18/04082-5 |
| 5 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 331/21 | 18/04082-5 |

**Upprunin til málið:**
Arktiska økið er vorði heimspolitikkur, har stórar tjóðir, ið ikki liggja í arktiska økinum royna at fáa ávirkan. Tað sama er galdandi fyri vinnu- og áhugafeløg. Føroyar er partur av arktiska økinum, og tað er týdningarmikið, at Føroyar arbeiða fyri at fáa so nógv ávirkan sum møguligt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í januar 2019 varð borgarstjórin boðin til Tromsø til ein fund millum borgarstjórar í arktiska økinum. Á fundinum luttóku borgarstjórar/umboð úr Norra, Svøríki, Íslandi, Finnlandi, Kanada og Føroyum. Á fundinum varð umrøtt, hvussu "tann lokala røddin" kann hoyrast í tí arktiska samstarvinum.

Á fundinum í Tromsø varð klárt, at her er áhugi millum borgarstjórarnar um at standa saman og saman søkja ávirkan á arktiska samstarvið.

Endamálið við foruminum er at fáa ávirkan á Arktiska Ráðið. Forumið vil, at "tann lokala røddin" fyllir meira í Arktiska Ráðnum og ynskir at ávirka ta fíggjarligu, sosialu og umhvørvisligu menningina í arktiska økinum.

Forumið kann tó eisini verða grundarlag fyri samstarvi um til dømis ferðavinnu, vinnumenning, stimbran av íverksetarum, framleiðslu av lokalum matvørum, reinari orku, burðardyggar loysnir, fíggjarligari menning, bústaðarloysnir, sjóvinnu, kt-loysnir, tele-kommunikatión, smart-city, útbugving og nógvum øðrum.

Borgarstjórarnir tóku á fundinum avgerð um at seta niður ein arbeiðsbólk við embætisfólkum úr øllum londunum, sum skal gera eitt uppskot til felags visjón, arbeiðssetning, ítøkilig mál, strategi, og hvussu forumið skal skipast. Harundir um limaskap, limagjald og skrivstovu ressoursir.

Eitt embætisfólk frá Tórshavnar kommuna luttekur í arbeiðsbólkinum, og ætlanin er, at arbeiðsbólkin skal leggja eitt uppskot fyri forumið á fundi 8. mai 2019 í Rovaniemi, har borgarstjórin frá Tórshavn eisini luttekur.

Ætlanin er, at borgarstjórin hevur møguleiki fyri at taka undir við eini avtalu við hinar borgarstjórarnar um karmarnar kring forumið við tí fyrivarni, at avtalan skal góðkennast í býráðnum.

Avtalan fer allarhelst at bera við sær eitt limagjald, men enn er eingin avtala um, hvat kostnaðurin verður.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Kunnað varð um málið.
Ískoyti: Ein arbeiðsbólkur hevur arbeitt víðari við uppskoti til stovningarskjal fyri Arctic Mayors Forum. Ætlanin er, at skjalið skal undirskrivast av borgarstjórunum á næsta fundi, sum verður í Akureyri tann 10. oktober 2019, og at aðalfundur fyri Arctic Mayors Forum verður tá.

Fyri at borgarstjórin kann skriva undir, skal stovningarskjalið góðkennast av Býráðnum.

Skjalið er í 7. punktum:

1. Motivatión fyri AMF Í galdandi arktisku politisku skipanini er eingin formlig og strukturerað mannagongd fyri at taka kommunalu og lokalu økini uppí politiskar avgerðir.

2. Missión Missiónin er at tryggja, at lokalir myndugleikar luttaka í arktiskum politikki fyri at tryggja, at greitt verður frá virðum, málum og áhugamálum hjá fólkunum í arktiskum samfeløgum, og at tey verða tikin við í ætlanir um at fáa góð livikor, burðardygga menning og sterk samfeløg í arktiska økinum. Eisini er missiónin at fáa uppbygt eitt tætt samstarv og samskipan millum limir í AMF og onnur.

3. Mál AMF hevur 5 mál: - Eyðmerkja, samskipa og miðla felags mál. - Skipa eitt forum fyri orðaskifti fyri limirnar. - Samstarva og deila “best practices”. - Ávirka politikk og lógarsmíð. - Blíva eygleiðari í Arktiska Ráðnum

4. Høvuðsevnir Málini fyri burðardygga mening hjá ST eru yvirskipaði karmurin fyri arbeiðinum hjá AMF við serligum atliti at: - Búskapi - Undirstøðukervi - Mentan - Veðurlagstillaging og umhvørvi - Vitan, intelligensi og dygdargóðari útbúgving - Tøkni og talgilding - Góðari stýriskipan og diplomati - Javnstøðu - Trivnaði og rættvísi - Trygd og fullveldi

5. Limaskapur Borgarstjórar og demokratiskt valdir leiðarar í lokalum stýrum, sum eru í limalondunum hjá Arctic Council, hava møguleika at fáa fullan limaskap. Fullur limaskapur gevur møguleika at luttaka í øllum eindum og virksemi í AMF.

6. Fyribíls bygnaður AMF hevur fylgjandi eindir: 1. Aðalfundur Aðalfundur er annaðhvørt ár fyri allar limir, har høvuðsstjórnin verður vald, og politikkur, raðfestingar og átøk hjá AMF verða umrødd og samtykt. Ringrásin fylgir skeiðnum hjá formansskapinum í Arktiska Ráðnum. 2. Høvuðsstjórn Høvuðsstjórnin setur í verk átøk hjá AMF fyri tíðarskeiðið millum aðalfundirnar. Í høvuðsstjórnini sita 9 limir, sum umboða USA, Canada, Rusland, Grønland, Føroyar, Ísland, Finnland, Svøríki og Norra. 3. Sekretariat Sekratariatið er mannað við trimum fólkum. Eitt umboð fyri landið, ið hevur formannsskapin í Arktiska Ráðnum, eitt umboð fyri tað landið, sum fær formansskap næsta tíðarskeið, og tað triðja umboðið. Sekratariatið tekur sær av uppgávum kring aðalfund og fyri høvuðsstjórn og arbeiðsbólkar umframt samskifti. 4. Arbeiðsbólkar og verkætlanarnir Arbeiðsbólkar verða settir av høvuðsstjórnini. Eisini kunnu verkætlanir setast í verk, um talan er um strategiskar tilgongdir og snýr seg um høvuðsevnir hjá AMF.

7. Virksemi og átøk 1. Lýsa politisk sjónarmið og gera skrivligt tilfar fyri at ávirka Arktiska Ráðið, altjóða stovnar ella ríkisstjórnir. 2. Miðla og deila frágreiðingar og upplýsingar um virksemið hjá AMF. 3. Gera heimasíðu og miðla á sosialu miðlunum. 4. Almannakunngera verkætlanir hjá AMF. 5. Luttaka á týdningarmiklum Arktiskum pallum. 6. Fáa samband við vinnu- ella evnisráðstevnur. 7. Arktiskir borgarstjórar kunnu umboða AMF á altjóða tiltøkum.

8. Umsitingarlig og fíggjarlig viðurskifti Í fyrstu skiftu: - Umsitingarliga tilfeingið verður felags og sekretariatið gongur uppá skift. - Fígging til verkætlanir má fáast lokalt, nationalt ella internationalt. Seinni: - Limagjald - Sekretariatið má vera fulla tíð á einum verandi grundarlagi.

Viðurskiftini í Arktiska økinum fylla meira og meira, og luttøka í AMF gevur kommununi møguleika at fáa vitan, ávirka og samstarva við lond og økir, sum kommunan annars ikki hevur so nógv við at gera. Tað er ein inngongd til at kunna gangnýta nýggjar møguleikar, sum broytingar í arktiska økinum eisini geva.

Sum avtalan er orðað í løtuni, verður kommunan ikki bundin fíggjarliga, annað enn at nýta umsitingarliga tilfeingið og luttaka í fundum, sum verða. Uppá longri sigt verður tó allarhelst talan um eitt limagjald. Talan kann tó eisini verða um at luttaka í verkætlanum, og her kann talan verða um at fíggja ein part.

Mælt verður til, at luttøka í verkætlanunum verður fíggjað av teimum fakøkjum, sum luttaka, til dømis innan umhvørvisøkið, ferðavinnuøkið. Verða aðrar útreiðslur, verður mælt til at fíggja tær av 7310 Vinnustrategi.

Skjøl Arctic Mayors' Forum (AMF) Foundation Document

Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x) Fyri Tórshavnar kommunu Fyri ávís økir í kommununi
Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Fyri vinnuna
Umsitingaravleiðingar Umhvørvisavleiðingar Sosialar avleiðingar Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar x

Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at góðkenna stovningarskjalið fyri AMF, so at borgarstjórin kann undirskriva skjalið á fundi í Akureyri 10. oktober 2019.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við málinum vísandi til, at málið kann hava fíggjarligar bindingar við sær fyri kommununa, ið ikki enn eru nágreinaðar.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 4 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:** Síðani stovningarskjalið varð samtykt í býráðnum í september 2019, hevur Arctic Mayors Forum arbeitt víðari við at skipa samstarvið millum luttakandi býirnar. Á fundi í desember skal støða takast til at skipa samstarvið á meira formligan hátt, herundir at áseta limagjald fyri einstøku býirnar.

Støða skal tískil takast til, um Tórshavnar kommuna ynskir at luttaka í samstarvinum undir teimum treytum, sum eru í uppskoti, ella um kommunan skal taka seg úr samstarvinum/fyribils steðga við luttøkuni í Arctic Mayors Forum.

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir til, at støða verður tikin til framtíðar luttøkuna hjá Tórshavnar kommunu í Arctic Mayors Forum undir teimum treytum, sum eru í uppskoti til aðalfundin í desember 2021, ella um kommunan skal steðga heilt ella fyribils við luttøku sínari í samstarvinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, mælir til at steðga samstarvinum í Arctic Mayors Forum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, mælir til, at samstarvið í Arctic Mayors Forum heldur fram, og at tikið verður undir við uppskotinum um limagjald v.m. til aðalfundin í desember 2021.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Ruth Vang |
| | Birita Baldvinsdóttir Iversen | |